| | Býráðsfundur<br>27. apríl 2017 | Blað nr.: 1 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 27. apríl 2017 **Kl**. 18:00
**Stað**: Býráðssalurin
**Málsnr:**

**FUNDARLEIÐARI:**
Annika Olsen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Helena Dam á Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Gunvør Balle
Turið Horn
Bergun Kass
Heðin Mortensen
Sjúrður Olsen

**LUTTÓKU EISINI:**

**LUTTÓKU IKKI:**
Halla Samuelsen, vegna forfall.

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 116/17 | 17/01364-1 | Bogi Andreasen: farloyvi frá býráðnum | 3 |
| 117/17 | 17/00041-1 | Mál beind í nevndir 2017 | 4 |
| 118/17 | 17/00635-1 | Søla av matr.nr. 1322l, Tórshavn til Bústaðir. | 5 |
| 119/17 | 17/01075-2 | Matr. nr. 1326ac, Tórshavn. Sókn Advokatar søkir vegnað eigara kommununa um loyvi til víðarisølu av ognini. | 13 |
| 120/17 | 14/03408-18 | Nýggjur skúli í vesturbýnum (2012-1064) | 15 |
| 121/17 | 17/01123-2 | Kvøldskúlin: Stakgreinalestur miðnám, málskeið í føroyskum o.a. | 28 |
| 122/17 | 17/01146-1 | Hækka ansingarsamsýning | 30 |
| 123/17 | 17/01147-1 | Um hospice, palliativa umsorgan v.m | 32 |
| 124/17 | 17/01148-1 | Um at skipa heilsuhjálparaútbúgving og heilsurøktaraútbúgving í Tórshavn | 34 |
| 125/17 | 14/03118-2 | Ferðslukanningar kring økið við skúladepilin í Marknagili | 36 |
| 126/17 | 17/00649-2 | Uppskot um marknaumskipan millum matr. nr. 1090 og 1091, Tórshavn | 42 |
| 127/17 | 16/00460-5 | Býlingavegur millum Blómubrekku og Villingadalsvegin 2. stig (2013-2048) | 45 |
| 128/17 | 17/00503-1 | Serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 1116a, 1118a og 1118b undir Gráasteini, Tórshavn | 49 |
| 129/17 | 16/01392-2 | SEV: Umsókn um lendi og broyting av byggisamtykt til víðkan av Sundsverkinum | 51 |
| 130/17 | 17/01099-1 | Uppskot til víðari framferð av húsinum í Brekkugrund | 56 |
| 131/17 | 16/01873-1 | Fíggjarætlan 2017 | 58 |
| 132/17 | 17/01274-1 | Framflytingar roknskaparárið 2016 | 71 |
| 133/17 | 17/01275-1 | Ársroknskapur fyri Tórshavnar kommunu 2016 | 72 |
| 134/17 | 17/00303-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2017 | 73 |

## ***116/17 Bogi Andreasen: farloyvi frá býráðnum***

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 116/17 | 17/01364-1 |

**Málslýsing:** Bogi Andreasen hevur boðað frá, at honum berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Sjúrður Olsen, eru loknar.

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Einmælt samtykt.

# 117/17 Mál beind í nevndir 2017

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 26.01.2017 | 42/17 | 17/00041-1 |
| 2 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 61/17 | 17/00041-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.03.2017 | 92/17 | 17/00041-1 |
| 4 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 117/17 | 17/00041-1 |

**Málslýsing:**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 26. januar 2017:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. mars 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Einmælt samtykt.

# 118/17 Søla av matr.nr. 1322l, Tórshavn til Bústaðir.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 27/17 | 17/00635-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.03.2017 | 57/17 | 17/00635-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.04.2017 | 81/17 | 17/00635-1 |
| 4 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 118/17 | 17/00635-1 |

**Málslýsing:**
Matr. nr. 1322l, Tórshavn. Vídd 3.018. Grundstykkið er óútgrivið.

Bústaðir hevur ætlanir um at byggja íbúðir á matriklini 1322l, 1322i og 1322k, Tórshavn.

Bústaðir hevur frammanundan bygt vestan fyri vegin, og verður talan um framhald av hesari bygging.

Kommunan hevur broytt byggisamtyktina, soleiðis at til ber at byggja til bústaðarendamál á økjunum. Sí mál 16/02881.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Samtykt.

**Ískoyti:**
Framhaldandi ætlanir um bygging av raðhúsum hjá Bústaðum á matriklarnar 1322i, 1322k og 1322l hóska væl til dámin í økinum. Broytta byggisamtyktin, ið heimilar bygging av fleiri raðhúsum sýnist býarskipanarliga, vera ein góð loysn fyri økið, sum hevur ligið óbygt í mong ár, tí raðhús eru bæði fyri sunnan og norðan. Haraftrat liggur økið væl fyri við góðum útsýni, góðum vegasambandi, bussleið og tætt at handilsøki. Sí kortskjal yvir økið á Óðinshædd.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at kommunan selur Bústaðum matrikul 1322l, og at kunna teknisku nevnd um ætlanina av søluni, og síðani beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. mars 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.
Gunvør Balle luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti.**

Kommunan hevur áður selt óbygt lendið til Bústaðir fyri kr. 156,- m2.

Í samband við at kommunan í 2013, seldi lendið á Óðinshædd til Bústaðir fyri kr. 156m2, fekk kommunan loyvi frá Innlendismálaráðnum, sí skjal 2002-0627/40

Innlendismálaráðið vísir millum annað til at sambært § 1 í løgtingslóg nr. 62 frá 31. Mai 2010 um Húsalánsgrunn, er endamálið við Húsalánsgrunninum, at øll í Føroyum skuluhava møguleika fyri at útvega sær ein bústað, at tryggja fjølbroytni áBústaðarmarknaðinum og at stuðla upp undir veðurlagspolitikkin við at minka umorkunýtslu í føroyska býlishópinum.

Sambært § 5b kunnu kommunurnar saman við Húsalánsgrunninum utvega, reka og leiga út íbúðir, íbúðarhús og lestraríbúðir.

Innlendismálaráðið metir tí, at Tórshavnar kommuna røkir ein konkretan sakligankommunalan áhuga við søluni av grundøkjum til Bústaðir – Føroya Bústaðarfelag.

Um kommunan selur grundøkini undir marknaðarprís, skal kommunan tryggja sær, at tann kommunali áhugin verður røktur í samband við søluna, soleiðis at grundøkini verða nýtt til tað endamál, sum er treytin fyri søluni.

Kommunan skal tá í avtaluni við keypara tryggja sær, at bygt verður í samsvar við fortreytirnar í lógini um Húsalánsgrunn, m.a. at leigugjaldið verður so lágt sum møguligt, at bústaðirnir fáa álagt bústaðarskyldu, at bústaðirnir verða bygdir við atliti at orkusparing og nýtslu av alternativum orkusløgum, og at matriklarnir ikki kunnu seljast ella avhendast til onnur endamál uttan góðkenning kommununar.

<u>Í samband við søluna til Bústaðir setir kommunan millum annað hesar treytir í skeytið.</u>

Øll bygging skal vera í trá við galdandi byggisamtyktir fyri økið.
Kommunan treytar sær at bygt verður í samsvar við fortreytirnar í lógini um Húsalánsgrunn, m.a. at leigugjaldið verður so lágt sum møguligt, at bústaðirnir fáa álagt bústaðarskyldu, at bústaðirnir verða bygdir við atliti at orkusparing og nýtslu av alternativum orkusløgum, og at matriklarnir ikki kunnu seljast ella avhendast til onnur endamál uttan góðkenning kommununar.

Skeytið verður eisini áteknað servituttbindandi við eini áseting um 2 ára byggifreist frá tinglýsingardegi, og at grundstykkið kann fella aftur til kommununa móti at uppruna keypspeningurin uttan rentur verður afturgoldin. Fellur grundstykkið aftur av hesi orsøk, og keyparin hevur byrjað bygging, kann hann fáa prógvaðar útreiðslur endurgoldnar uttan rentur í tann mun, tað gjørda arbeiðið kemur seljaranum ella øðrum keypara av sama grundstykki til góðar.

Allar útreiðslur í samband við møguliga afturskeyting falla tilkeypara. Tórshavnar kommuna verður hildin skaðaleys fyri eini og hvørjari útreiðslu í hesum sambandi.

Samskifti hevur verið við Bústaðir, har kommunan hevur fráboðað ynski um, at ávísur partur, t.d. í minsta lagi 1/3, av íbúðunum, ið nú skulu byggjast, skulu vera rørðsluvinarligar, tvs. bygdar og innrættaðar til eldri og fólk annars við skerdum fysiskum førleika, og sum kunnu búgva í íbúð.

**Tilmæli.**

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at selja matr. nr. 1322l, Tórshavn, addr. Óðinshædd 19 til Bústaðir.

Grundøkið er til víddar 3.018 m2, og verður selt fyri 156. kr. fermeturin ella í alt kr. 470.808,00

Keyparin rindar allar útreiðslur til avgreiðslu av skeytinum, herundir útreiðslur til tinglýsing.

**Ískoyti.**

Kommunan hevur áður selt óbygt lendið til Bústaðir fyri kr. 156,- m2.

Í samband við at kommunan í 2013, seldi lendið á Óðinshædd til Bústaðir fyri kr. 156m2, fekk kommunan loyvi frá Innlendismálaráðnum, sí skjal 2002-0627/40

Innlendismálaráðið vísir millum annað til at sambært § 1 í løgtingslóg nr. 62 frá 31. Mai 2010 um Húsalánsgrunn, er endamálið við Húsalánsgrunninum, at øll í Føroyum skuluhava møguleika fyri at útvega sær ein bústað, at tryggja fjølbroytni áBústaðarmarknaðinum og at stuðla upp undir veðurlagspolitikkin við at minka umorkunýtslu í føroyska býlishópinum.

Sambært § 5b kunnu kommunurnar saman við Húsalánsgrunninum utvega, reka og leiga út íbúðir, íbúðarhús og lestraríbúðir.

Innlendismálaráðið metir tí, at Tórshavnar kommuna røkir ein konkretan sakligankommunalan áhuga við søluni av grundøkjum til Bústaðir – Føroya Bústaðarfelag.

Um kommunan selur grundøkini undir marknaðarprís, skal kommunan tryggja sær, at tann kommunali áhugin verður røktur í samband við søluna, soleiðis at grundøkini verða nýtt til tað endamál, sum er treytin fyri søluni.

Kommunan skal tá í avtaluni við keypara tryggja sær, at bygt verður í samsvar við fortreytirnar í lógini um Húsalánsgrunn, m.a. at leigugjaldið verður so lágt sum møguligt, at bústaðirnir fáa álagt bústaðarskyldu, at bústaðirnir verða bygdir við atliti at orkusparing og nýtslu av alternativum orkusløgum, og at matriklarnir ikki kunnu seljast ella avhendast til onnur endamál uttan góðkenning kommununar.

<u>Í samband við søluna til Bústaðir setir kommunan millum annað hesar treytir í skeytið.</u>

Øll bygging skal vera í trá við galdandi byggisamtyktir fyri økið.
Kommunan treytar sær at bygt verður í samsvar við fortreytirnar í lógini um Húsalánsgrunn, m.a. at leigugjaldið verður so lágt sum møguligt, at bústaðirnir fáa álagt bústaðarskyldu, at bústaðirnir verða bygdir við atliti at orkusparing og nýtslu av alternativum orkusløgum, og at matriklarnir ikki kunnu seljast ella avhendast til onnur endamál uttan góðkenning kommununar.

Skeytið verður eisini áteknað servituttbindandi við eini áseting um 2 ára byggifreist frá tinglýsingardegi, og at grundstykkið kann fella aftur til kommununa móti at uppruna keypspeningurin uttan rentur verður afturgoldin. Fellur grundstykkið aftur av hesi orsøk, og keyparin hevur byrjað bygging, kann hann fáa prógvaðar útreiðslur endurgoldnar uttan rentur í tann mun, tað gjørda arbeiðið kemur seljaranum ella øðrum keypara av sama grundstykki til góðar.

Allar útreiðslur í samband við møguliga afturskeyting falla tilkeypara. Tórshavnar kommuna verður hildin skaðaleys fyri eini og hvørjari útreiðslu í hesum sambandi.

Samskifti hevur verið við Bústaðir, har kommunan hevur fráboðað ynski um, at ávísur partur, t.d. í minsta lagi 1/3, av íbúðunum, ið nú skulu byggjast, skulu vera rørðsluvinarligar, tvs. bygdar og innrættaðar til eldri og fólk annars við skerdum fysiskum førleika, og sum kunnu búgva í íbúð.

**Tilmæli.**

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at selja  matr. nr. 1322l, Tórshavn, addr. Óðinshædd 19 til Bústaðir.

Grundøkið er til víddar 3.018 m2, og verður selt fyri 156. kr. fermeturin ella í alt kr. 470.808,00

Keyparin rindar allar útreiðslur til avgreiðslu av skeytinum, herundir útreiðslur til tinglýsing.

**Ískoyti.**

Kommunan hevur áður selt óbygt lendið til Bústaðir fyri kr. 156,- m2.

Í samband við at kommunan í 2013, seldi lendið á Óðinshædd til Bústaðir fyri kr. 156m2, fekk kommunan loyvi frá Innlendismálaráðnum, sí skjal 2002-0627/40

Innlendismálaráðið vísir millum annað til at sambært § 1 í løgtingslóg nr. 62 frá 31. Mai 2010 um Húsalánsgrunn, er endamálið við Húsalánsgrunninum, at øll í Føroyum skuluhava møguleika fyri at útvega sær ein bústað, at tryggja fjølbroytni áBústaðarmarknaðinum og at stuðla upp undir veðurlagspolitikkin við at minka umorkunýtslu í føroyska býlishópinum.

Sambært § 5b kunnu kommunurnar saman við Húsalánsgrunninum utvega, reka og leiga út íbúðir, íbúðarhús og lestraríbúðir.

Innlendismálaráðið metir tí, at Tórshavnar kommuna røkir ein konkretan sakligankommunalan áhuga við søluni av grundøkjum til Bústaðir – Føroya Bústaðarfelag.

Um kommunan selur grundøkini undir marknaðarprís, skal kommunan tryggja sær, at tann kommunali áhugin verður røktur í samband við søluna, soleiðis at grundøkini verða nýtt til tað endamál, sum er treytin fyri søluni.

Kommunan skal tá í avtaluni við keypara tryggja sær, at bygt verður í samsvar við fortreytirnar í lógini um Húsalánsgrunn, m.a. at leigugjaldið verður so lágt sum møguligt, at bústaðirnir fáa álagt bústaðarskyldu, at bústaðirnir verða bygdir við atliti at orkusparing og nýtslu av alternativum orkusløgum, og at matriklarnir ikki kunnu seljast ella avhendast til onnur endamál uttan góðkenning kommununar.

<u>Í samband við søluna til Bústaðir setir kommunan millum annað hesar treytir í skeytið.</u>

Øll bygging skal vera í trá við galdandi byggisamtyktir fyri økið.
Kommunan treytar sær at bygt verður í samsvar við fortreytirnar í lógini um Húsalánsgrunn, m.a. at leigugjaldið verður so lágt sum møguligt, at bústaðirnir fáa álagt bústaðarskyldu, at bústaðirnir verða bygdir við atliti at orkusparing og nýtslu av alternativum orkusløgum, og at matriklarnir ikki kunnu seljast ella avhendast til onnur endamál uttan góðkenning kommununar.

Skeytið verður eisini áteknað servituttbindandi við eini áseting um 2 ára byggifreist frá tinglýsingardegi, og at grundstykkið kann fella aftur til kommununa móti at uppruna keypspeningurin uttan rentur verður afturgoldin. Fellur grundstykkið aftur av hesi orsøk, og keyparin hevur byrjað bygging, kann hann fáa prógvaðar útreiðslur endurgoldnar uttan rentur í tann mun, tað gjørda arbeiðið kemur seljaranum ella øðrum keypara av sama grundstykki til góðar.

Allar útreiðslur í samband við møguliga afturskeyting falla tilkeypara. Tórshavnar kommuna verður hildin skaðaleys fyri eini og hvørjari útreiðslu í hesum sambandi.

Samskifti hevur verið við Bústaðir, har kommunan hevur fráboðað ynski um, at ávísur partur, t.d. í minsta lagi 1/3, av íbúðunum, ið nú skulu byggjast, skulu vera rørðsluvinarligar, tvs. bygdar og innrættaðar til eldri og fólk annars við skerdum fysiskum førleika, og sum kunnu búgva í íbúð.

**Tilmæli.**

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at selja  matr. nr. 1322l, Tórshavn, addr. Óðinshædd 19 til Bústaðir.

Grundøkið er til víddar 3.018 m2, og verður selt fyri 156. kr. fermeturin ella í alt kr. 470.808,00

Keyparin rindar allar útreiðslur til avgreiðslu av skeytinum, herundir útreiðslur til tinglýsing.

**Ískoyti.**

Kommunan hevur áður selt óbygt lendið til Bústaðir fyri kr. 156,- m2.

Í samband við at kommunan í 2013, seldi lendið á Óðinshædd til Bústaðir fyri kr. 156m2, fekk kommunan loyvi frá Innlendismálaráðnum, sí skjal 2002-0627/40

Innlendismálaráðið vísir millum annað til at sambært § 1 í løgtingslóg nr. 62 frá 31. Mai 2010 um Húsalánsgrunn, er endamálið við Húsalánsgrunninum, at øll í Føroyum skuluhava møguleika fyri at útvega sær ein bústað, at tryggja fjølbroytni áBústaðarmarknaðinum og at stuðla upp undir veðurlagspolitikkin við at minka umorkunýtslu í føroyska býlishópinum.

Sambært § 5b kunnu kommunurnar saman við Húsalánsgrunninum utvega, reka og leiga út íbúðir, íbúðarhús og lestraríbúðir.

Innlendismálaráðið metir tí, at Tórshavnar kommuna røkir ein konkretan sakligankommunalan áhuga við søluni av grundøkjum til Bústaðir – Føroya Bústaðarfelag.

Um kommunan selur grundøkini undir marknaðarprís, skal kommunan tryggja sær, at tann kommunali áhugin verður røktur í samband við søluna, soleiðis at grundøkini verða nýtt til tað endamál, sum er treytin fyri søluni.

Kommunan skal tá í avtaluni við keypara tryggja sær, at bygt verður í samsvar við fortreytirnar í lógini um Húsalánsgrunn, m.a. at leigugjaldið verður so lágt sum møguligt, at bústaðirnir fáa álagt bústaðarskyldu, at bústaðirnir verða bygdir við atliti at orkusparing og nýtslu av alternativum orkusløgum, og at matriklarnir ikki kunnu seljast ella avhendast til onnur endamál uttan góðkenning kommununar.

<u>Í samband við søluna til Bústaðir setir kommunan millum annað hesar treytir í skeytið.</u>

Øll bygging skal vera í trá við galdandi byggisamtyktir fyri økið.
Kommunan treytar sær at bygt verður í samsvar við fortreytirnar í lógini um Húsalánsgrunn, m.a. at leigugjaldið verður so lágt sum møguligt, at bústaðirnir fáa álagt bústaðarskyldu, at bústaðirnir verða bygdir við atliti at orkusparing og nýtslu av alternativum orkusløgum, og at matriklarnir ikki kunnu seljast ella avhendast til onnur endamál uttan góðkenning kommununar.

Skeytið verður eisini áteknað servituttbindandi við eini áseting um 2 ára byggifreist frá tinglýsingardegi, og at grundstykkið kann fella aftur til kommununa móti at uppruna keypspeningurin uttan rentur verður afturgoldin. Fellur grundstykkið aftur av hesi orsøk, og keyparin hevur byrjað bygging, kann hann fáa prógvaðar útreiðslur endurgoldnar uttan rentur í tann mun, tað gjørda arbeiðið kemur seljaranum ella øðrum keypara av sama grundstykki til góðar.

Allar útreiðslur í samband við møguliga afturskeyting falla tilkeypara. Tórshavnar kommuna verður hildin skaðaleys fyri eini og hvørjari útreiðslu í hesum sambandi.

Samskifti hevur verið við Bústaðir, har kommunan hevur fráboðað ynski um, at ávísur partur, t.d. í minsta lagi 1/3, av íbúðunum, ið nú skulu byggjast, skulu vera rørðsluvinarligar, tvs. bygdar og innrættaðar til eldri og fólk annars við skerdum fysiskum førleika, og sum kunnu búgva í íbúð.

**Tilmæli.**

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at selja  matr. nr. 1322l, Tórshavn, addr. Óðinshædd 19 til Bústaðir.

Grundøkið er til víddar 3.018 m2, og verður selt fyri 156. kr. fermeturin ella í alt kr. 470.808,00

Keyparin rindar allar útreiðslur til avgreiðslu av skeytinum, herundir útreiðslur til tinglýsing.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2017:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Bergun Kass og Marin Katrina Frýdal taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið við teirri viðmerking, at dentur skal leggjast á, at í minsta lagi 1/3 av íbúðunum eru rørðsluvinarligar, tvs. eru bygdar og innrættaðar til eldri og fólk við skerdum, fysiskum førleika.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass og Gunvør Balle

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Helena Dam á Neystabø og Tróndur Sigurðsson

Atkvøddu blankt: Bjørghild Djurhuus og Heðin Mortensen

## 119/17 Matr. nr. 1326ac, Tórshavn. Sókn Advokatar søkir vegnað eigara kommununa um loyvi til víðarisølu av ognini.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.04.2017 | 80/17 | 17/01075-2 |
| 2 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 119/17 | 17/01075-2 |

**Málslýsing:**

**Upplýsingar um grundstykkið.**
Addr. Staravegur 20.
Vídd. 2.614m2.
Stykkið er planerað, men annars óbygt.
Byggisamtykt. B4. Vinnuøki.
Grundstykkið verður brúkt til bilagoymslu í samband bilasøluna, sum verður rikin á matr. nr. 1326i, Tórshavn.

**Ásetingar í skeytinum í samband við frá býtið frá 1991.**
Grundstykkið ( parkeringsøki ) varð í 1991 frábýtt matrikli nr. 1326i, til sjálvstøðugt matrikul nr.
Kommunan setti tá krav um at deklaratión varð tinglýst:
At frábýtti luturin kann ikki seljast fyrr enn hús eru bygd á stykkinum.
Um eigarin vil selja stykkið óbygt, hevur býráðið tá forkeypsrætt og tá fyri uppruna keypspeningin og skjalprógvaðum útreiðslum fyri arbeiðið sum gjørt er á stykkinum. Átalurætt hevur Tórshavnar býráð.

**Ásetingar í uppruna skeytinum.**
Í uppruna fyribils skeytinum frá 1978 – 1979 og endaliga skeytinum frá 1980 framgongur um byggiskyldu.
Eigarin av hesum eigindómi bindur seg  til at fullfíggja sína bygging ella góðkent 1. Stig av henni innan 4 ár eftir, at byggibúningin er lokin.
Verður ikki gjørt sum ásett í pkt. d. ( sí omanfyri ) kann tórshavnar kommuna krevja sær ognarrættin til økið aftur ímóti fullum endurgjaldi av dokumenteraðum útreiðslum hjá eigaranum við rentu 5 % p.a. frá yvirtøkudegnum at rokna, hetta tó í fyrsta lagi frá tí av at rokna, at ein útreiðsla er borin.
Er nøkur bygging farin fram, so endurrindar Tórshavnar kommuna keyparanum dokumenteraðu útreiðslur hansara til hesa, um annars nýtsla kann gerast av tí bygda.
Semjast partarnir ikki um hetta og/ella um endurgjaldið, verður tað at áseta av einum gerðarrætti, har Tórshavnar kommuna útmeldar 1 lim, keyparin 1, meðan triði limurin, ið er formaður, verður útnevndur av Føroya rætti.

**Ognarkskifti er tinglýst í 2004.**
Verandi eigari keypti óbygda grundstykki í 2004 fyri 2,3 mill. kr.

**Brúkið í dag.**
P/F Waag, rekur í dag bilsølu/og bilverkstað á matr. nr. 1326i, Tórshavn og keypir nú matr. nr. 1326ac, sum framhaldandi eins og nú verður brúkt til vørugoymsluna hjá felagnum.

Møgulig víðarisøla krevur góðkenning frá Tórshavnar kommunu, vísandi til at bygningur ikki er bygdur á stykkið og at kommunan hevur forkeypsrætt til grundstykkið.

Sókn Advokatar søkir um at kommunan góðkennur søluna og víkir forkeypsrættin í hesum førinum.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini, mæla til at góðkenna víðarisøluna og til at víkja forkeypsrættin til matr. nr. 1326ac, Tórshavn.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Einmælt samtykt.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Heðin Mortensen og Gunvør Balle

# 120/17 Nýggjur skúli í vesturbýnum (2012-1064)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 24.06.2014 | 151/14 | 14/03408-18 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.06.2014 | 203/14 | 14/03408-18 |
| 3 Býráðsfundur | 25.06.2014 | 148/14 | 14/03408-18 |
| 4 Mentamálanevndin | 20.10.2014 | 207/14 | 14/03408-18 |
| 5 Mentamálanevndin | 11.02.2015 | 22/15 | 14/03408-18 |
| 6 Mentamálanevndin | 06.05.2015 | 72/15 | 14/03408-18 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2015 | 117/15 | 14/03408-18 |
| 8 Mentamálanevndin | 19.10.2015 | 209/15 | 14/03408-18 |
| 9 Tekniska nevnd | 20.10.2015 | 112/15 | 14/03408-18 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.10.2015 | 199/15 | 14/03408-18 |
| 11 Býráðsfundur | 21.10.2015 | 173/15 | 14/03408-18 |
| 12 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 236/15 | 14/03408-18 |
| 13 Fíggjarnevndin | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 14 Býráðsfundur | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 15 Mentamálanevndin | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 16 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 12/16 | 14/03408-18 |
| 17 Mentamálanevndin | 10.02.2016 | 24/16 | 14/03408-18 |
| 18 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 52/16 | 14/03408-18 |
| 19 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 38/16 | 14/03408-18 |
| 20 Mentamálanevndin | 04.05.2016 | 133/16 | 14/03408-18 |
| 21 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 158/16 | 14/03408-18 |
| 22 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 128/16 | 14/03408-18 |
| 23 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 222/16 | 14/03408-18 |
| 24 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 162/16 | 14/03408-18 |
| 25 Mentamálanevndin | 17.10.2016 | 273/16 | 14/03408-18 |
| 26 Mentamálanevndin | 27.10.2016 | 275/16 | 14/03408-18 |
| 27 Fíggjarnevndin | 27.10.2016 | 364/16 | 14/03408-18 |
| 28 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 247/16 | 14/03408-18 |
| 29 Fíggjarnevndin | 16.11.2016 | 367/16 | 14/03408-18 |
| 30 Mentamálanevndin | 24.11.2016 | 300/16 | 14/03408-18 |
| 31 Fíggjarnevndin | 29.11.2016 | 396/16 | 14/03408-18 |
| 32 Býráðsfundur | 30.11.2016 | 297/16 | 14/03408-18 |
| 33 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 323/16 | 14/03408-18 |
| 34 Mentamálanevndin | 06.12.2016 | 312/16 | 14/03408-18 |
| 35 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 404/16 | 14/03408-18 |
| 36 Býráðsfundur | 26.01.2017 | 44/17 | 14/03408-18 |
| 37 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 71/17 | 14/03408-18 |
| 38 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 120/17 | 14/03408-18 |
| 39 Mentamálanevndin | 24.04.2017 | 89/17 | 14/03408-18 |
| 40 Fíggjarnevndin | 26.04.2017 | 103/17 | 14/03408-18 |

## Málslýsing:

**2012-1064/17 SG**

**Fyrireika bygging av nýggjum skúla**

Arbeiðsbólkur og arbeiðssetningur
Í álitinum um skúlabygnað og skúlabygging 2012-2021 (sí mál 2011-0679), sum skúlastýrini eisini hava viðgjørt og gjørt viðmerkingar til, verður m.a. mælt til at byggja nýggjan trý sporaðan skúla í staðin fyri Tórshavnar kommunuskúla og Venjingarskúlan. Mælt verður eisini til at skipa forskúla og frítíðarskúla í øllum skúlum. Haraftrat er lagt upp til at hava tilboð til næmingar við serligum avbjóðingum.

Hesin nýggi skúlin hevur arbeiðsheitið Vesturskúli við tað, at hann ætlandi verður staðsettur í Vesturbýnum inn frá Landavegnum, har økið eisini er lagt av til at byggja ítróttahøll. Inn frá Marknagilsvegnum verður miðnámsskúladepilin granni.

Tørvur er á at gera uppskot til eitt meira útgreinað konsept bæði um samlaða virksemið í skúlanum og bygningin sjálvan. Hetta arbeiðið er at meta sum ein fyrsta fyrireiking og hugskotsgrundarlag fyri víðari politiskari viðgerð og støðutakan til at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá v.m.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at geva umsitingini heimild til at seta arbeiðsbólk við umboðum fyri umsitingina, skúlarnar, frítíðarskúlarnar og møguliga onnur at gera uppskot til yvirskipað konsept fyri nýggja skúlanum at lata mentamálanevndina aftur til viðgerðar í seinasta lagi 15. juni 2012.

**Mentamálanevndin 30. apríl 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 2. mai 2012:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Arbeiðsbólkurin hevur latið gera uppskot til yvirskipað konsept fyri nýggja skúlan, sí frágreiðing. Arbeiðsbólkurin hevur m.a. lýst námsfrøðiliga profilin við atliti at eitt nú ætlanini um deildarbýti, floks- og hølisbýti, samstarv millum lærarar og pedagogar, samstarv millum skúlar, serundirvísing og næmingatrivnað. Harumframt verður nomið við staðsetingina, bygningsstødd v.m.

Konseptið er í góðum samsvari við álitið um skúlabygnað og skúlabygging eins og viðmerkingarnar frá skúlastýrunum (máltal 2011-0679).

Mett verður, at tilfarið, ið arbeiðsbólkurin hevur latið úr hondum, saman við álitinum um skúlabygnað og skúlabygging og viðmerkingunum frá skúlastýrunum er haldgott grundarlag fyri at fara víðari í tilgongdini at fyrireika bygging av nýggjum Vesturskúla. Næsta stigið er sostatt at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá.

Til endamálið skal fígging fáast til vega. Í sambandi við heildarætlanina fyri Kommunuskúlan eru uml. 3 mió kr. ikki brúktar. Nýggi Vesturskúlin er ein samanlegging av Kommunuskúlanum og Venjingarskúlanum, og tí verður mett, at hesir pengar kunnu játtast og flytast til nýggju skúlaætlanina fyri hesar báðar skúlar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá til nýggjan Vesturskúla í samsvari við álitið um skúlabygnað og skúlabygging, og at áður játtað upphædd kr. 3 mió frá kontu 4175 Dagføring av skúlum L41003 Kommunuskúlin høvuðsumvæling verður flutt til bygging av nýggjum Vesturskúla.

**Mentamálanevndin 27. juni 2012:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
Ein minniluti: Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen taka støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 10. apríl 2013:** Málið varð umrøtt.

**Ískoyti:**
Ein arbeiðsbólkur við umboðum fyri leiðslur, lærarar og foreldur í skúlastýrunum í Venjingarskúlanum og Tórshavnar Kommunuskúla og umboðum fyri umsitingina (sí mál nr. 14/00423) hevur gjørt uppskot um bygnaðarliga samskipan og samanlegging av Venjingarskúlanum og Tórshavnar Kommunuskúla og tíðarætlan.

Á býráðsfundi 22. mai 2014 varð samtykt at broyta ætlaða talið av sporum í Vesturskúlanum soleiðis, at trý spor vera í yngru flokkunum og fimm spor í 8. og 9. flokki (sí mál nr. 14/00423).

Grundøkið við Landavegin, sum ætlanin er at byggja skúlan á, er 34.000 $m^2$, til samanberingar eru grundøkini hjá Skúlanum við Løgmannabreyt og Skúlanum á Argjahamri ávikavist 22.000 $m^2$ og 20.000 $m^2$.

Bygginevndin hevur viðgjørt uppskotið, sum ein arbeiðsbólkur læt úr hondum í juni 2012, og nevndin er samd um, at tað uppskotið er gott grundarlag at brúka í fyrireikingini at byggja nýggja skúlan í vesturbýnum.
Á fundi mikudagin 18. juni 2014 samtykti bygginevndin at biðja um, at 1.300.000 kr., sum settar eru av til av Vesturskúla, verða játtaðar til fyrireiking og til byggiskrá.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 1.300.000 kr. til fyrireiking og útvegan av byggiskrá av konto 4176 Nýbygging av skúlum.

**Mentamálanevndin 24. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 24. juni 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Støðan í dag.

Tøkt lendi, sum ætlanin er at byggja á:

| | | |
|---|---|---|
| Matr.nr. | 1099 | 14.660 m² |
| Matr.nr. | 1100 | 15.280 m² |
| Matr.nr. | 1102c | 5.879 m² |
| Tilsamans | | 35.819 m² |

Hesir matriklar eru allir D3-øki Almennir stovnar.

Samtykt er, at skúlin skal byggjast til 850 næmingar, og við grundarlagi í verandi skúlum við Løgmannabreyt og á Argjahamri eru umleið 14 m² fyri hvønn næming.
Nýggi skúlin skal sostatt vera 850 x 14 m² = 11.900 m² til støddar.

Neyðugt er at útvega meiri lendi, tí serstaka byggisamtyktin fyri Marknagil ásetur nettonýtslustig 0,3, sum krevur eitt grundøkið uppá 39.700 m².

Ætlanin er at nýta matr.nr. 1104d ella partar av hesum matrikli afturat. Kommunan eigur grundøkið, sum er 6.576 m² til støddar.

Soleiðis verður samlaða víddin økt úr 35.819 m² til 42.395 m².

Bygginevndin hevur á fundi 11. desember 2014 samtykt at mæla til, at matr.nr. 1104d verður lagt afturat samlaða økinum til Vesturskúlan.

Upplýsast skal, at matr.nr. 1104d er C3-øki Miðstaða- bústaðarbygging.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og verkætlanarleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. februar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur fingið 1.part av byggiskránni (Byggiskrá Fyritreytir) og mælir til at góðkenna hana við tí fyrivarni, at smærri tillagingar kunnu verða gjørdar av umsitingingini, áðrenn útbjóðað verður.

Víst verður til skjal 15/01528-2, sum er viðfest.

Sambært tíðarætlanini verða 2. og 3. partur av byggiskránni lidnir í september. 2. partur er námsfrøðilig viðurskifti og 3. partur er teknisk viðurskifti.

**Tilmæli til mentamálanevndina:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og góðkenna fyrsta part av byggiskránni.

**Ískoyti:**
Eftir at málið var fyri í mentamálanevndini, hevur fundur verið á teknisku deild við luttøku av umboðum fyri Landsverk og Rambøll um atkomuviðurskiftini til Vesturskúlan. Niðurstøðan frá fundinum var, at Rambøll skuldi koma við einum uppskoti til loysn og gera eina innkoyring frá Marknagilsvegnum ígjøgnum nevnda matr.1104d.
Mál 14-03118-22. Hjáløgdu kort sum vísa uppskot til loysn.

**Tilmæli til byggi- og býarskipanarnevndina:**
Tekniski stjórin og verkætlanarleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og teknisku deild og nýta matr. nr. 1104d fyri at halda kravið um nettunýtslustig til bygginginа og møguligan atkomuveg frá Marknagilsvegnum til Vesturskúlan.

**Mentamálanevndin 6. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til mentamálanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur 12. oktober 2015 samtykt endaliga byggiskrá fyri byggiverkætlanina Skúlin á Fløtum. Byggiskráin, ið er hjáløgd, er í trimum pørtum:

1. Fortreytir
2. Námsfrøðilig viðurskifti
3. Teknisk viðurskifti

**Grundøki**
Eitt øki í Marknagili er lagt av til Skúlan á Fløtum www.saf.fo . Økið er tilsamans 42.335 m$^2$ og er ogn hjá Tórshavnar kommunu.

Sambært serstøku byggisamtyktini fyri Marknagil kunnu bygningurin/bygningarnir í mesta lagi vera 10.583 $m^2$ við tilsamans 12.700 innrættaðum $m^2$. Støddin á skúlanum verður 11.600 $m^2$ við møguleika at byggja út til tveir flokkar aftrat í 7. árgangi.

**Kostnaður**
Metta samlaða íløgan til handverkaraútreiðslur uttan meirvirðisgjald verður:
11.600 $m^2$ av gólvvídd fyri 11.600 $m^2$ x 20.000 kr.= 232.000.000 kr.

**Tíðarætlan**
Byggingin verður skipað sum ein bygging í trimum byggistigum. Sambært tíðarætlanini verður fyrsta byggistig liðugt í juli 2018, og tá flytur miðdeildin (4.- 6-fl.) inn í skúlan. Annað byggistig er til hádeildina (7.-9.fl.), og tað verður liðugt í juli 2019. Í juli 2020 verður triðja byggisstig liðugt, og tá flytur grunddeildin (0-3- fl. og frítíðarskúli) inn í skúlan.

Málið verður viðgjørt í mentamálanevndini, tekniskunevnd, byggi- og býarskipanarnevndini, fíggjarnevndini og í býráðnum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, tekniski stjóri og býararkitekturin mæla mentamálanevndini til at góðkenna byggiskránna og at beina málið víðari til teknisku nevnd, ið skal beina málið víðari til byggi- og býarskipanarnevndina, ið skal beina málið umvegis fíggjarnevndina í býráðið.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í avvarðandi nevndir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at nevndin tekur undir við byggiskránni fyri tann partin sum viðkemur vegaføringar, ferðsluviðurskiftir og leiðingar í sambandi við verkætlanina, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 20. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Timæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at taka undir við byggiskránni, fyri tann partin, sum viðkemur býarskipan og staðseting, og at beina málið í býráðið umvegis Fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Halla Samuelsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Samtykt at góðkenna byggiskránna og at beina málið í býráðið, og heitt verður samstundis á teknisku nevnd um í góðari tið at skipa øll nøktandi vega- og ferðsluviðurskifti við skúlarnar.

**Býráðsfundir 21. oktober 2015:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti at góðkenna byggiskránna.

**Ískoyti**
Hugskotskappingin fyri Skúlan á Fløtum var útskrivað 23. oktober 2015 eftir at Tórshavnar býráð 21. oktober 2015 hevði samtykt byggiskránna fyri Skúlan.

Fýra ráðgevaratoymi vóru undangóðkend til at luttaka í hugskotskappingini.

Tey vóru:
- Elvi (Selmar Nielsen Arkitektar, Ósbjørn Jacobsen Arkitektar, LBF og SMJ)
- BIGKONTRAST (BIG-Bjarke Ingels Group, Kontrast byggilist og byggifrøði, LBF, SMJ)
- Árni Winter arkitektar, ZETA architects, SMJ og LBF
- MAP Arkitektar, Arkitektar 99, LBF og PB-Consult

18. desember 2015 lótu toymini inn síni boð uppá loysn og var tað latið navnloynt soleiðis, at nevndin ikki visti, hvat toymið átti hvat uppskot.

4. januar 2016 hevur dómsnevndin gjørt úrskurð og tilmæli í málinum um, hvat ráðgevaratoymið skal fáa møguleikan at innganga avtalu um ráðgeving, projektering og eftirlit av skúlabyggingini. Sí hjálagt dómsúrskurðin.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, tekniski stjórin og býararkitekurin mæla mentamálanevndini til at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini og at heimila umsitingini til at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið í dómsúrskurðinum um projektering og eftirlit, og at venda aftur við einum uppskoti til sáttmála.

**Mentamálanevndin 6. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 06. januar 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 06. januar 2016:** Einmælt samtykt at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini og heimila umsitingini at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið: Árni Winther arkitektar, ZETA architects, SMJ og LBF og uppskoti teirra, Eindirnar í heildini.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum hevur á fundi 9. februar 2016 samtykt samráðingarúrslitið frá samráðingunum hjá samráðingartoyminum (umboð frá bygginevnd og teknisku fyrisiting) við vinnandi ráðgevaratoymið í hugskotskappingini. Talan er um samtak, ið eitur Samtakið Eind Í/F (undir stovnan).

Hjálagdur er uppskot til sáttmála við tilhoyrandi fylgiskjølum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla til at heimila umsitingini til at innganga hjáløgdu ráðgevaraavtalu við Samtakið Eind Í/F.

**Mentamálanevndin 10. februar 2016:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Sigrun Mohr, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jógvan Arge, fílist á, at tilmælið við tilfari kom ikki fyrrenn á sjálvum fundinum og tekur ikki støðu til málið í dag.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í mentamálanevndini og at innganga hjáløgdu ráðgevaraavtalu við Samtakið Eind Í/F og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Verkætlanin er komin so mikið áleiðis at klárt er at fara undir jørðarbeiðið. Í fyrsta lagi avgrevstur, ið m.a. skal geva betri yvirlit til víðari jørðarbeiði t.e. spreinging, grovplanering, planering vm.

Útboð hevur verið av avgrevstrinum. Kostnaðarmetingin lá millum 1,1 og 1,4 mió. kr.

2 arbeiðstakarar vóru bodnir at bjóða. Lisitatión var 3. mai 2016 kl. 14.

Tilboðini vóru soljóðandi:

| | |
|---|---|
| P/F Articon | kr. 1.294.147 |
| H. V. Lützen | kr. 1.772.448 |

Ikki íroknað MVG.

Farast kann í holt við arbeiðið innan umleið 3 vikur.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at taka undir við at gera sáttmála við lægsta tilboðsgeva og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina. Sáttmálin væntast klárur til viðgerðina í figgjarnevndini.

**Mentamálanevndin 4. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Halla Samuelsen og Tróndur Sigurðsson vóru ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndni og beina málið í býráðið.

***Býráðsfundur 19. mai 2016: Einmælt samtykt.***

*Ískoyti*
*Á karminum eru fyri 2016 játtaðar 30,8 mio.kr. á stovnsnr. 4174 – Nýbygging skúlar (íløgur). Projekteringin av skúlanu er nú gott ígongd, umframt at jørðarbeiðið er um at fara í gongd. Tørvur er á áleið upphæddini til virksemi í ár.*

*Tilmæli*
*Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla at játta 30,8 mio.kr. á projektkonto L41012.*

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Eftir at fyrra útbjóðingin bleiv annulerað í summar hevur bygginevndin saman við Ráðgevarasamtakinum Eind gjøgnumgingið skipanaruppskotið vm. og gjørt ávísar tillagingar. Yvirlit sæst í hjálagda skjali.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at taka tillagingarnar til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 17. oktober 2016:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
20. oktober 2016 kl. 14 var licitatión uppá bygging av nýggjum skúlabygningi til Skúlan á Fløtum.

Hesi feløg/samtøk vóru boðin at bjóða í innbodnari licitatión og teirra høvuðsboð eru:

| | |
|---|---|
| P/F MT Højgaard Føroyar við undirarbeiðstakarum | - 287.151.814 kr. |
| P/F J&K Petersen, Sp/f Húsavarðatænastan og Sp/f TG Verk við undirarbeiðstakarum<br>(eisini nevnt: Samtakið í Havn) | - 298.955.524 kr. |
| P/F Articon og Sp/f Búsetur við undirarbeiðstakarum | - 267.809.320 kr. |

Høvuðsráðgevin Samtakið Eind Í/F hevur, eftir innanhýsis viðgerð og gjøgnumgongd av tilboðunum, saman við umboðum fyri Tórshavnar kommunu, latið tilmæli 26. oktober 2016 viðvíkjandi hvat av samtøkunum skal fáa í boði at gera eina partalagsavtalu (fasu I) og har ætlandi raka ein targetprís, sum síðani vil innibera eina endaliga partalagsavtalu (fasu II) og ein arbeiðstøkusáttmála.

Henda tilgongdin kemur ætlandi at byrja 1. november 2016 og gongur fram til í januar 2017, tá komið ætlandi verður aftur í nevndir og býráð við einum úrsliti og tilmæli.

Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum hevur 26. oktober 2016 viðgjørt tilmælið frá Samtakinum Eind og umrøtt málið saman við teknisku fyrisiting. Bygginevndin tekur undir við tilmælinum frá Samtakinum Eind (sí tilmælið á nevndarportalinum).

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekurin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at fara í partalag (fasu I) við lægsta tilboðsgeva. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 27. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 27. oktober 2016:** Samtykt og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Við atliti til tryggja javna gongd og framhald í verkætlanini, er nú klárt at innganga arbeiðstakarasáttmála um víðari jørðarbeiðið. Avgrevsturin er framdur og byggipláss-økið riggað til, herundir við skúrum til verkætlanarsamskipanina vm.

Næsta stigið, sum hesin arbeiðstøkusáttmálin fevnir um, er spreinging og planering. Uppskot til sáttmála og kostnaðarmeting verður tøkt til fundin. Sáttmálin um víðari jørðarbeiðið er við lægsta tilboðsgeva frá lisitatiónini Samtakið Articon - Búsetur. Fígging er tøk á játtanini til Skúlan á Fløtum.

Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum viðger sáttmálan týsdagin áðrenn fundin í mentamálanevndini.

Sáttmáli um størra partin av høvuðsarbeiðstøkuni (byggingin) verður klárur tá fasa 1 í partalagnum verður liðug í fyrsta ársfjórðingi í 2017.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekurin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at innganga arbeiðstakarasáttmála við Samtakið Articon – Búsetur um jørðarbeiði fíggjað av kontu 4176 Nýggir skúlar L41012 Skúlin á Fløtum.

**Fíggjarnevndin 16. november 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Mett verður, at samlaði íløgutørvurin til byggingina av Skúlanum á Fløtum fíggjarárið 2017 verður umleið kr. 70 mió.

Í uppskotinum til fíggjarætlan fyri 2017 eru settar kr. 42,075 mió av til endamálið. Í hesum sambandi er fráboðað, at írestandi fíggingin til komandi fíggjarár kr. 28 mió skal játtast sum eykajáttan í inniverandi fíggjarári av løgukarmi 5175 Musikkskúlin.

Partalagssáttmáli er undirskrivaður. Umframt avgrevsturin, sum er liðugur, verður grót- og spreingiarbeiðið byrjað í ár, og byggingin av sjálvum bygninginum byrjar ætlandi í apríl 2017.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjóri mæla til at samtykkja eykajáttan kr. 28 mió av løgukarmi 5175 Musikkskúlin til løgukontu 4176 Nýbygging skúlar L41012 Skúlin á Fløtum.

**Mentamálanevndin 24. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta kr. 28 mió av løgukarmi 5175 Musikkskúlin til løgukontu 4176 Nýbygging skúlar L41012 Skúlin á Fløtum við teirri viðmerking, at meirinntøkurnar fyri fíggjarárið 2016 skulu játtast til arbeiðið at byggja Musikkskúlan og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 29. november 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið at viðgera tvær ferðir.

**Býráðsfundur 30. november 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Við atliti til tryggja javna gongd og framhald í verkætlanini, er nú klárt at innganga arbeiðstakarasáttmála um víðari jørðarbeiðið. Avgrevsturin er framdur og byggipláss-økið riggað til, herundir við skúrum til verkætlanarsamskipanina vm.

Næsta stigið, sum hesin arbeiðstøkusáttmálin fevnir um, er spreinging og planering. Uppskot til sáttmála er gjørt, kostnaðarmetingin fyri arbeiðið er kr. 7.386.512 u/mvg. Harumframt koma útreiðslur til byggipláss uml. kr. 500.000 og mvg, samlaður kostnaður umleið kr 8.500.000. Sáttmálin um víðari jørðarbeiðið er við lægsta tilboðsgeva frá lisitatiónini Samtakið Articon - Búsetur. Fígging er tøk á játtanini til Skúlan á Fløtum.

Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum viðger sáttmálan týsdagin áðrenn fundin í mentamálanevndini.

Sáttmáli um størra partin av høvuðsarbeiðstøkuni (byggingin) verður klárur tá fasa 1 í partalagnum verður liðug í fyrsta ársfjórðingi í 2017.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekurin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at innganga arbeiðstakarasáttmála við Samtakið Articon – Búsetur um jørðarbeiðið og játta kr. 8.500.000 av kontu 4176 Nýggir skúlar L41012 Skúlin á Fløtum.

**Mentamálanevndin 6. desember 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ì sambandi við, at byggiverkætlanin verður skipað í partalagssamstarvi millum Tórshavnar kommunu, Samtakið Eind Í/F og Samtakið Articon – Búsetur Í/F, skal sbrt. partalagsskipanini skipast ein stýrisbólkur við umboðum fyri Tórshavnar kommunu og bæði samtøkini.

Bygginevndin, sum hevur virkað higartil, gongur tí út, men mælt verður til, at býráðið velur umboð í stýrisbólkin.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla býráðnum til at velja umboð í stýrisbólkin í partalagnum.

**Býráðsfundur 26. januar 2017:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Vald vóru Gunnvør Balle, Jákup Dam, Helena Dam á Neystabø og Heðin Mortensen.

**Ískoyti:**
Partalagsavtala varð undirskrivað 17. november 2016. Síðani hava partarnir arbeitt við at gjøgnumganga og menna verkætlanina sbrt. ætlanini í partalagsavtaluni, herundir at fáa sent myndugleikaprojekt til góðkenning hjá byggivaldinum. Hetta var gjørt fyrst í apríl og er endaligt svar væntandi um stutta tíð.

Eisini er arbeitt við at fáa ásett endaliga byggikostnaðin. Í tilgongdini eru fleiri tilagingar gjørdar við atliti til at náa ein nøktandi targetkostna samsvarandi upprunaligu ætlanini, sí hjálagt skjal. Eisini sæst at, í tilgongdini eru nakrar postitiónir, sum av misgáum ikki vóru við í upprunaliga útboðstilfarinum/nøgdarlistunum, og sum nú eru roknaðar við.

Targetprísurin er nú ásettur til kr. 247.000.000 við avhending í einum byggistigi 1. apríl 2020, tó so, at møguliga vilja partar av verkætlanini kunna verða liðug áðrenn, men er ov tíðiliga at áseta tað enn. Arbeiðið kann byrja at kalla beinanvegin. Verandi arbeiðstøka við planering er um at vera liðug.

Nú er klárt at taka støðu til um farast skal víðari í partalagsfasu 2 og gera høvuðsarbeiðstøkusáttmála.

Kostnaðarkarmurin fyri alla verkætlanina (HVÚ, ókent, prís- og lønarvøkstur, heildarráðgeving, eftirlit, listprýði v.m. umframt mvg) er nú kr. 383.073.750.

Higartil eru játtaðar kr. 101.752.000 til verkætlanina, harav kr. 42.075.000 er standa í løgukarmi 4176 Nýbygging skúlar fyri fíggjarárið 2017, og aðrar kr. 37.809.000 standa sum minninýtsla fyri 2016 og tí skulu framflytast í sambandi við ársroknskapin hjá kommununi.

Írestandi fíggjartørvur avrundað er sostatt kr. 281.323.000, ið skulu játtast yvir fíggjarárini 2018, 2019 og 2020. Mett verður, at fíggjartørvurin fyri inniverandi ár er kr. 61.015.000, tvs., at í inniverandi fíggjarárið er kr. 18.869.000 sett ov nógv av, og kann løgukarmurin tí lækkast fyri inniverandi fíggjarár.

Samlaði fíggjartørvurin fyri árini 2018, 2019 og 2020 verður sambært hesum tí kr. 300.192.000. býtt soleiðis samsvarandi væntaðum útreiðslutørvi fyri hesi ár: í 2018 kr. 110.175.000, í 2019 kr. 127.383.000, og í 2020 kr. 62.634.000.

Hjáløgd málinum er:
a) frágreiðing um fyriliggjandi forprojekt til góðkenningar
b) uppskot til høvuðsarbeiðstøkusáttmála við Samtakið Articon-Búsetur Í/F
c) kostnaðaryvirlit

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at góðkenna hjálagda forprojekt og høvuðsarbeiðstøkusáttmála og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina, har samlaði kostnaðarkarmurin fyri byggingina er kr. 383.073.750.

Til tess mæla trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin til at játta fyri fíggjarárið 2017 kr. 23.206.000 á løgukarminum 4176 Nýbygging skúlar út á løgukontu L41012 Skúlin á Fløtum, og flyta minninýtslu á somu løgukontu fyri fíggjarárið 2016 kr. 37.809.000, og at írestandi upphæddin kr. 300.192.000 fyri árini 2018, 2019 og 2020 verður játtað samsvarandi býtinum omanfyri, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 24. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevdini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Einmælt samtykt.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Heðin Mortensen og Gunvør Balle.

# 121/17 Kvøldskúlin: Stakgreinalestur miðnám, málskeið í føroyskum o.a.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 05.04.2017 | 72/17 | 17/01123-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.04.2017 | 85/17 | 17/01123-2 |
| 3 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 121/17 | 17/01123-2 |

**Málslýsing:**
Í strategimáli 1 hjá Kvøldskúlanum er ásett: Dygdargóð skeiðstilboð: Dygd skal eyðkenna undirvísingar- og skeiðstilboðini. Reglugerð eftirmeting og dagføring av frítíðartilboðum er sjálvsagdur lutur eins og virkin eggjan og samtala við borgarar um menning av tænastuni.

M.a. við støði hesum hevur Kvøldskúlin eftirmett:
a). Stakskeið, miðnám
b). Framhaldsskeið 2 og 3 i Føroyum sum fremmandamál
c). Prísskipanina.

Kvøldskúlin hevur eisini, saman við mentamáladeildini verið í innleiðandi samskifti við Mentamálaráðið um pkt. a) og b).

Broytingin í pkt. a og b krevur góðkenning frá landsstýrisfólkinum í mentamálum sbrt. § 7, stk. 2 í lógini um frítíðarundirvísing.

Broyting í pkt. c. krevur góðkenning frá landsstýrisfólkinum í mentamálaum sbrt. § 18 í lógini um frítíðarundirvísing.

Fýra skjøl frá Kvøldskúlanum eru hjáløgd.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:
a). at samtykkja dagføringina av stakgreinalestrinum
b). at samtykkja dagføringina av framhaldsskeiði 2 og 3 í føroyskum sum fremmandamál
c). prísskipaninan fyri komandi skúlaár.

**Mentamálanevndin 05. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>27. apríl 2017 | Blað nr.: 29<br><br>Formansins merki: |

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Einmælt samtykt.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Heðin Mortensen og Gunvør Balle.

# 122/17 Hækka ansingarsamsýning

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Eldranevndin | 03.04.2017 | 4/17 | 17/01146-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.04.2017 | 84/17 | 17/01146-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 122/17 | 17/01146-1 |

**Málslýsing:**
Forkvinnan ynskir at seta fram uppskot um, at samsýningin fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima verður hækkað til tess at eggja fleiri at gerast ansarar.

Skipanin
Við heimild í § 12 í lóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. og kunngerð um umsiting av samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum persónum, kann kommuna velja at veita persóni ansingarsamsýning.

Samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima hevur til endamáls at tryggja, at tann óhjálpni fær støðuga røkt og hjáveru soleiðis, at hann kann verða verandi heima heldur enn á røktarheimi.

Samsýning fyri at ansa kann verða veitt, tá ið tann óhjálpni hevur fylt 67 ár, og tørvur er á støðugari røkt og hjáveru. Tað er, at brúk er fyri hjálp, umsjón og umsorgan alt samdøgrið.

Heilsu- og umsorganartænastan metir, hvørt ansing er rætta tilboðið og hvørt umsøkjari er førur fyri at átaka sær uppgávuna at ansa. Ein heildarmeting av heilsuligu og sosialu viðurskiftunum hjá umsøkjaranum er grundarlag fyri avgerð, hvørt samsýning kann verða játtað.

Ansarin má ikki hava stórvegis annað lønt arbeiði. Vegleiðandi ikki meira enn 20 tímar um vikuna. Hevur ansarin arbeiði við síðuna av ansingini, má trygd vera fyri, at onnur eru í húsinum, sum kunnu vera um tann óhjálpna, tá ið ansarin er til arbeiðis.

Játtanin til ansingarsamsýning í fíggjarætlanini hjá Heilsu- og umsorganartænastuni fyri 2017 er kr 2.459.000. Hetta svarar til umleið 17 ansarar í miðal um árið. Í løtuni er 16 ansarar. Eingin óviðgjørd umsókn liggur í løtuni. Lýst verður við møguleikanum á torshavn.fo og við faldarum.

Sbrt. § 4 í omanfyri nevndu kunngerð er ásett, at samsýningin, sum er skattskyldug, er kr. 10.789 um mánaðin.
Skal upphæddin í ansingarsamsýning broytast, krevst kunngerðarbroyting, ið bert landsstýriskvinnan í almannamálum kann fremja. Metast má, at aðrar kommunur hava hugsan um hetta mál eisini, og at málið, um tikið verður undir við tí, eigur at verðar sent Kommunufelagnum at viðgera.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og Heilsu- og umsorganarstjórin mæla til at umrøða uppskotið og evt. senda málið til Kommunufelagið um býráðið.

**Eldranevndin 03. apríl 2017:** Samtykt at heita á býráðið um at taka upp mál við Kommunufelagið og Almannamálaráðið at hækka ansingarsamsýningina.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Einmælt samtykt.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Heðin Mortensen og Gunvør Balle.

# 123/17 Um hospice, palliativa umsorgan v.m

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Eldranevndin | 03.04.2017 | 5/17 | 17/01147-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 123/17 | 17/01147-1 |

**Málslýsing:**
Í samgonguskjalinum hjá býráðsmeirilutan er mál, at kommunan saman við landsmyndugleikum fer undir tilgongd at útvega hóskandi høli til hospice.

Einki hospice er í Føroyum, men ein palliativ eind er á Landssjúkrahúsinum.

Í árinum 2000 setti landsstýrið arbeiðsbólk at kanna tørvin og møguleikarnar fyri at seta á stovn hospice funktión/palliativa eind/heimahospice. Í tilmæli frá 2001 verður komið fram til, at ein hospicestovnur við 7 seingjarplássum hevði kunnað nøktað tørvin á samlaðu palliativu viðgerðini í Føroyum. Hesi tøl eru grundað á hagtøl frá tíðarskeiðnum 1996-1999. Tørvurin skal takast við tí fyrivarni.

Í tilmælinum verður eisini lýst, hvussu palliativa umsorganin kann fara fram í Føroyum. Víst verður á palliativar eindir á sjúkrahúsunum ella bert á Landssjúkarhúsinum, á heimahospice, á palliativar eindir á røktarheimum og á sjálvsøðugt hospice.

Eitt sjálvstøðugt hospice verður í tilmælinum mett at vera dýrasta loysnin.

Tilmælið leggur dent á krøv til fysiska og fakliga umhvørvið. Ein palliativ eind skal ikki vera størri enn so, at ein kann varðveita eina atmosferu av nærveru og næstakærleika, men hinvegin ikki vera so lítil, at tað ikki eru fíggjarligir og fakligir karmar til at hava neyðugan fleksibilitet og starvsfólk við fakligum kunnleika alt samdøgrið.

Tá um heimahospice ræður, verður sagt, at um heimarøktin verður optimerað, kann heimarøktin fyri ein stóran part veita palliativa viðgerð sum heimahospice, men treyt er, at palliativa teamið á Landssjúkrahúsinum er knýtt at. Palliativa teamið er ein tvørfakligur bólkur við serfrøðingum, hvørs uppgáva m.a. er at ráðgeva starvsfólk, sum eru um sjúklingin og í summum førum eisini tey avvarðandi.

Palliativ umsorgan verður dagliga veitt í Heilsu- og umsorganartænastuni, hetta bæði á bústovnum og í heima hjá borgarunum. Hetta verður veitt sum sjálvsagdur partur av tí tænastu, sum Heilsu- og umsorganartænastna veitir. Tað er tó ikki skipað sum hospicefunktión, har palliativir sjúkligar verða savnaðir, men verður veitt har borgarin er antin í egnum heimi ella á bústovni. Um talan er um borgara á bústovni, er tað starvsfólkini har, sum veita tað palliativu umsorganina, og um talan er um borgarar, sum eru í egnum heimi, so er tað heimatænastan, sum veitir tænastuna.

Heilsu- og umsorganartænastan merkir tørvin á einum hospice í Føroyum við tað, at ofta er stórt trýst á at veita palliativum sjúklingi búpláss soleiðis, at røktarheimi meira gerst eitt hospice heldur enn eitt heim fyri røktarkrevjandi borgarar. Hetta er ein avbjóðing, tí palliatión krevur meira av resursum, bæði fakliga og fíggjarliga, umframt at tað ávirkar húsfólkini, at fólk koma inn á búeindir at doyggja.

Samanumtikið er palliativ umsorgan v.m. eitt landspolitiskt ábyrgdarøki, men har kommunurnar hava leiklut í ávísan mun samsvarandi lógini um eldrarøkt, heimatænastu v.m. Júst hvønn leiklut er ikki neyvt ásett, eins og at eingin beinleiðis skipan og samskipan er millum heilsuverkið og eldraøkið/heimatænastuna hesum viðvíkjandi.

Mett verður tí skilagott, at býráðið heitir á Heilsumálaráðið og evt. Kommunufelagið um at taka mál upp soleiðis, at ein samlað skipan við hospicefunktión/palliativari umsorgan verður sett í verk, fyrst og fremst her í Havn, men møguliga eisini aðrastaðni í landinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla býráðnum til at heita á Heilsumálaráðið og Kommunufelagið um at fáa sett í verk eina samlaða skipan við hospicefunktión/palliativari umsorgan, fyrst og fremst her í Havn, men møguliga eisini aðrastaðni í landinum.

**Eldranevndin 03. apríl 2017:** Samtykt at mæla býráðnum til at heita á Heilsumálaráðið um at skipa hospice í Tórshavn.

Bogi Andreasen luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Einmælt samtykt.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Heðin Mortensen og Gunvør Balle.

# 124/17 Um at skipa heilsuhjálparaútbúgving og heilsurøktaraútbúgving í Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
| --- | --- | --- | --- |
| 1 Eldranevndin | 03.04.2017 | 6/17 | 17/01148-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 124/17 | 17/01148-1 |

**Málslýsing:**
Ein av stóru avbjóðingunum innan eldraøkið, bæði nú og enn meira í framtíðini, er at rekruttera nóg mikið av útbúnum starvsfólki til røkt og sjúkrarøkt. Bæði í eldrapolitikkinum og í býráðssamgonguskjalinum verður víst á týdningin, at eldraøkið skal draga til sín starvsfólk og besta fakkunnleika.

Í Føroyum er settur á stovn almennur Heilsuskúli, sum heldur til í Hovi í Suðuroy, har til ber at útbúgva seg til heilsuhjálpara, sum tekur 15 mánaðir, og til heilsurøktara, sum tekur 22 mánaðir.

At til ber at taka hesar útbúgvingar í Føroyum hevur gjørt, at talið av heilsuhjálparum og heilsurøktarum er hægri enn áður. Hetta er við til at betra fakliga støðið í røktartænastunum.

Tað verða tó ikki útbúgvin nóg nógvir heilsuhjálparar og heilsurøktarar. Støðan er tann, at Heilsu- og umsorganartænastan hevur stóran tørv á útbúnum fólki, men tað, at Heilsuskúlin heldur til í Suðuroy ger, at fleiri av ófaklærdu starvsfólkunum setast aftur, tí tey ikki meta seg hava møguleika at fara til Suðuroyar at nema sær hesar útbúgvingar.
Talan er í flestu førum um kvinnur við familju, gjarna smærri børnum, sum ikki meta tað møguligt hjá teimum at vera í Suðuroy millum hálvtannað til trý ár fyri at fáa útbúgving.

Fyri einum mánaði síðani gjørdi Heilsu- og umsorganartænastan eina leysliga kanning, sum vísti, at áleið 30 ófaklærd starvsfólk ynsktu at taka útbúgvingina, um møguleiki var fyri at taka hana norðanfjørðs. Staðfestast kann, at tá hesar heilsuútbúgvingar bert kunnu takast í Suðuroy, so er tað fyri fleiri ein forðing.

Heilsu- og umsorganartænastan hevur meira enn einaferð tosa við leiðsluna á Heilsuskúlanum um møguleikan fyri, at skúlin skipar t.d. eitt hold av lesandi heilsuhjálparum og heilsurøktarum í Tórshavn ella aðrastaðni norðanfjørðs, men svarið hevur higartil verið noktandi. Víst verður m.a. til, at tað hevði verið ein stór fíggjarlig útreiðsla fyri skúlan, um undirvísing skuldi verið í Tórshavn.

Tað er Mentamálaráðið, sum varar av heilsuskúlanum og harvið eisini, at skúlin hevur nøktandi útbúgvingartilboð til tann tørv á fakliga útbúnum røktarstarvsfólki, sum Heilsu- og umsorganartænastan og onnur eldrasamstørv kring landið longu hava og framyvir koma at hava uppaftur størri.

Heilsu- og umsorganartænastan hevur fingið fyrispurning frá líknandi skúla í Danmark um møguleikan fyri, at skúlin kemur hendavegin at útbúgva heilsuhjálparar og heilsurøktarar. Heilsu- og umsorganartænastan hevur higartil valt ikki gjørt meira við henda fyrispurning.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og Heilsu- og umsorganarstjórin mæla býráðnum til at heita á Mentamálaráðið um eisini at skipa útbúgving sum ávikavist heilsuhjálpari og heilsurøktari í Tórshavn.

**Eldranevndin 03. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Bogi Andreasen luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Tikið av skrá.

# 125/17 Ferðslukanningar kring økið við skúladepilin í Marknagili

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 17.06.2014 | 200/14 | 14/03118-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.06.2014 | 191/14 | 14/03118-2 |
| 3 Býráðsfundur | 25.06.2014 | 143/14 | 14/03118-2 |
| 4 Tekniska nevnd | 08.10.2014 | 255/14 | 14/03118-2 |
| 5 Ferðslunevndin | 18.12.2014 | 87/14 | 14/03118-2 |
| 6 Ferðslunevndin | 26.02.2015 | 27/15 | 14/03118-2 |
| 7 Ferðslunevndin | 10.03.2015 | 36/15 | 14/03118-2 |
| 8 Tekniska nevnd | 08.04.2015 | 44/15 | 14/03118-2 |
| 9 Fíggjarnevndin | 22.04.2015 | 103/15 | 14/03118-2 |
| 10 Býráðsfundur | 23.04.2015 | 79/15 | 14/03118-2 |
| 11 Tekniska nevnd | 07.10.2015 | 89/15 | 14/03118-2 |
| 12 Tekniska nevnd | 04.11.2015 | 138/15 | 14/03118-2 |
| 13 Fíggjarnevndin | 11.11.2015 | 278/15 | 14/03118-2 |
| 14 Býráðsfundur | 19.11.2015 | 218/15 | 14/03118-2 |
| 15 Tekniska nevnd | 06.04.2016 | 44/16 | 14/03118-2 |
| 16 Tekniska nevnd | 01.06.2016 | 63/16 | 14/03118-2 |
| 17 Tekniska nevnd | 18.04.2017 | 29/17 | 14/03118-2 |
| 18 Fíggjarnevndin | 19.04.2017 | 87/17 | 14/03118-2 |
| 19 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 125/17 | 14/03118-2 |

**Málslýsing:**
Í sambandi við ætlaðu byggingina kring skúladepilin í Marknagili verður roknað við nógvari øktari ferðslu. Væntast kann eisini, at útstykkingarbyggingar oman fyri Marknagilsvegin fara at gera sítt til øktu ferðsluna. Harnæst kann væntast økt ferðsla til Argir, tá brúgvin um Sandá verður tøk seinni í 2016.

Sambært frágreiðingum frá 2006, ið umsitingin hevur latið gera saman við ráðgeva frá Rambøll ísv. heildarætlan fyri Tórshavnar kommunu, verður m.a víst á ein framtíðar tørv fyri 'trafikafvikling' grundað á framskrivingum av ferðslutrýstinum. Í hesum sambandi verður brúk fyri at gera eina ítøkiliga ferðsluanalysu av ferðsluviðurskiftunum, sum m.a. skal lýsa støðuna í dag og hvussu verður, tá alt skúlaøkið verður fult útbygt.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Umsitingin hevur fingið eina kostnaðarmeting áljóðandi kr. 70.000,- u/mvg fyri arbeiðið. Afturat hesum koma útreiðslur fyri ferðaútreiðslur og fundarvirksemi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka av tilboðnum og at játta kr. 125.000 til kanningararbeiðið av konto 8175 Aðrar vegaverkætlanir.

**Tekniska nevnd 17. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 18. juni 2014:** Samtykt og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin kemur, saman við ráðgeva, at kunna um málið.

**Tekniska nevnd 8. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur móttikið frágreiðing (j. nr. 14/03118-12: notat vedr. trafikafvikling i univeritetsområdet, november 2014) umframt eina framløgu/film um ferðslusimulering (j.nr.14/03118-15) av framtíðar ferðslu á økinum kring allan skúladepilin. Í frágreiðingini eru ymisk uppskot um vega-íbindingar gjøgnumgingin og verður m.a ført fram, at besta loysn er uppskot nr. 7, sum tekur støði í at verandi innkoyring frá Marknagilsvegnum verður uppstigað til eitt stórt signalanlegg. Harumframt verður lagt upp til at býlingarnir undir Gráasteini eisini verða knýttir í hetta vegamótið.

**Ferðslunevndin 18. desember 2014:** Kunnað var um málið. Arbeitt verður víðari við málinum.

**Ískoyti:**
Í framhaldandi viðgerð av uppskoti nr. 7, eru staðfestir smærri ferðslutrupulleikar í simuleringini í sambandi við avgreiðslu av ferðslu inni á universitetsøkinum í Marknagili. Umsitingin hevur tí í samráð við ráðgeva og umboð fra Landsverki latið gera eitt dagført uppskot 14/03118-23 uppskot nr. 8, sum tekur støði í tveimum signalanleggum fram við Marknagilsvegnum í staðin fyri einum, sum uppskot nr. 7 legði upp til. Tann eina íbindingin verður staðsett 230 sunnan fyri verandi íbinding og hin einar 140 m norðanfyri. Harumframt verður í uppskotinum lagt upp til at vegastrekkið millum komandi Vesturskúlan og Musikkskúlan og Skúladepilin í Marknagili, sum skal gerast sum sivugøta, kemur at bera ferðslu til og frá í ferðslutrýstinum í morgunmeldrinum, meðan tað í hinum dagtímunum burturav verður ætlað til bleyta ferðslu.

**Ferðslunevndin 26. februar 2015:** Málið umrøtt.

**Ferðslunevndin 10. mars 2015:** Nevndin mælir til at taka undir við uppskoti 8 samsvarandi notati 02 frá 19. februar 2015 frá Rambøll. Málið beint í teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Saman við fyrilggjandi uppskoti nr. 8, sum tekur støði í trimum vegamótum við ljósreguleringum og vegaloysn inni á sjálvum skúlaøkinum – frá Landavegnum umvegis Musikkskúlan og Vesturskúlan, skal tekniska nevnd taka støðu til fígging av hesum framtíðar íløgum.

Eftir sum ferðslutrýstið endurspeglar nýtsluna av økinum, vildi tað verið hóskandi at býtt arbeiðið upp í 3 stig, vísandi til at Skúladepilin og Musikkskúlin byrja á heysti í 2016 og Vesturskúlin í 2019.

1. Marknagil ferðsla 1. stig
   Talan er um gerð av nýggjum vegamóti við ljósregulering. Staðsetingin er við sunnara markið á matr. nr. 1104d. Tórshavn, eigari: Tórshavnar kommuna.
   Fyribils mettur kostnaður – uml. 3 mió. kr.

Arbeiðið má gerast liðugt innan august 2016

2. Marknagil ferðsla 2. stig
   Talan er um vegagerð inni á matr. nr. 1104d, 1102c, 1099 og 917, har Tórshavnar kommuna er eigari av øllum matriklum. Vegagerðin fevnir um ein uml. 10-12 m breiðan veg við eini samlaðari longd upp á uml. 500 m.
   Fyribils mettur kostnaður – uml. 10 mió. kr.
   Arbeiðið má gerast liðugt innan august 2019
3. Marknagil ferðsla 3. stig
   Talan er um regulering av vegamótunum við Landavegin og Kirkjubøarvegin og tillaging av vegastrekkinum ímillum.
   Fyribils mettur kostnaður – uml. 6 mió. kr.
   Arbeiðið má gerast liðugt innan august 2019

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Samlaði kostnaðurin fyri omanfyri nevndu arbeiði gerst sostatt uml. 19 mió. kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 500.000,- til projektering.

**Tekniska nevnd 08. apríl 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina at ávísa fígging.

**Fíggjarnevnd 22. april 2015:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at játta kr. 500.000,- av konto 8175, aðrar vegaverkætlanir og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin leggur fram uppskot um vegaætlan. Nevndin skal taka støðu til vegaætlan og útbjóðingarhátt.

**Tekniska nevnd 07. oktober 2015:** Umsitingin greiddi frá málinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur, saman við ráðgeva, gjørt eina kostnaðarmeting grundað á skitsuuppskot av byggistigunum 1 og 2, áljóðandi kr. 16,9 mió. Kostnaðarmetingin fyri byggistig 1 er kr. 6,3 mió. og fyri byggistig 2 kr. 10,6 mió. Víst verður til j. nr. 15/03118-47.

Mett verður at tað er skilagott at fremja bæði byggistigini í einum, vísandi til at arbeiði býtt í tvær arbeiðstøkur førur við sær eyðkaútreiðslur ísv. tilrigging og avrigging av arbeiðsplássi v.m.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 16,9 mió. til gerð av útbjóðingartilfari fíggjað av íløgum fyri vegir. Mælt verður til at játtanin verður framd soleiðis, at kr. 4,3 mió. verða játtaðar í 2016 og kr. 12,6 mió. í 2017. Mælt verður harumframt til at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið

**Tekniska nevnd 04. november 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 11. november 2015:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at játta kr. 4,3 mió. í 2016 og kr. 12,6 mió. kr. í 2017 fíggjað av til íløgum til vegir til gerð av útbjóðingartilfari og vegi.

**Býráðsfundur 19. november 2015:** Einmælt samtykt at játtað kr. 4,3 mió í 2016 og at seta kr. 12,6 mió á íløgujáttanina fyri 2017.

Borgarstjórin ynskir at viðgera málið í teknisku nevnd.

**Tekniska nevnd 06. apríl 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt tvey uppskot til vegaføring inni á skúlaøkinum við íbinding í Landsvegin og Marknagilsvegin og vegin, ið gongur eystur til Glasir.

**Prosjektuppskot nr. 1**
Uppskotið tekur støði i einum sokallaðum sivivegi, har vegbanabreiddin er 2*3 m við gongubreytum í báðum síðum á 2 m. Vegurin er ikki egnaður til bussferðslu. Um bussurin koyrir á hesum vegi, so noyðist hann at nýta koyrimáta B, og tá verður ikki hildið at trygdin er í lagi. Tá nýtir bussurin vegaareal á økinum hjá mótkoyrandi ferðslu.

**Prosjektuppskot nr. 2**
Uppskotið tekur støði í sama vegaprofili sum í uppskoti nr. 1, men vegaføringin er broytt til at kunna taka bussferðslu við teimum býbussunum, sum Tórshavnar kommuna nýtir í løtuni. Teir eru 9 m langir. Tað vil siga, at bussurin nýtir koyrimáta A, sum er meiri plásskrevjandi og bleytari kurvar.
Hetta vil hava við sær, at neyðugt verður at fáa til vega nakað av lendinum hjá Dagstovninum við Landavegin, matr. nr. 918b, Tórshavn umleið 480 $m^2$ av lendinum.
Neyðugt verður eisini at samráðast um at fáa til vega umleið 100 $m^2$ av lendinum, matr. nr. 917, Tórshavn, sum eg ogn hjá nýggja musikkskúlanum.

**Av og áseting við nýggja skúla á Fløtum**
Ætlanin er at gera ein geira til av- og áseting av skúlabørnum í høgra borði av vegnum, tá koyrt verður frá Landavegnum og niðan til skúlaøkið.
Tá koyrt verður frá Marknagilsvegnum og oman ímóti skúlaøkinum, so hevur umsitingin heitt á ráðgevan um at gera eitt uppskot til av- og áseting í høgra borði, har børnini ganga ígjøgnum ein tunnil undir vegnum og inn á skúlaøkið. Tann parturin er við lágdeildina, har lendið liggur lágt.
Um uppskotið skal bera til, so er neyðugt við samráðingum við sjálvsognarstovnin, sum varðar av Dagstovninum við Landavegin og harvið matr. nr. 918b, Tórshavn.
Uppskotið leggur eisini upp til, at ein gøta verður gjørd frá barnagarðsøkinum og niðan til tunnilin, soleiðis at barnagarðsbørn eisini kunnu gagnnýta spæliøkið við nýggja skúlan á Fløtum.

**Íbindingin í Marknagilsvegin**
Umsitingin hevur kannað, um tað er møguleiki fyri at flyta íbindingina einar 20 – 25 m vestureftir, soleiðis at parkeringsarealið til skúlan kemur at liggja á somu síðu eystaru megin atkomuvegin til skúlaøkið, men tá verður neyðugt at taka einar 500 fermetrar av ognini hjá Kristniboðssambandið, matr. nr. 919b.

**Skjøl í málinum**
TK j. nr. 16/02144-1: Uppskot nr. 1 Plantekning og yvirlitstekning

TK j. nr. 16/02144-2: Uppskot nr. 2 Plantekning og yvirlitstekning

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at arbeitt verður víðari við prosjektuppskoti nr. 2, og at gera høvuðsprosjekt og bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión til fimm arbeiðstakarar at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 01. juni 2016:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.
Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Sigrun Mohr og Bogi Andreasen, samtykti at loyva innkoyring eftir verandi vegi, Janusargøta, frá báðum síðum á Marknagilsvegnum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við fyrireikingarnar at byggja nýggja Skúlan á Fløtum, eru ynskir frammi um at gera ein arbeiðsveg frá Marknagilsvegnum og oman til arbeiðsøkið, har tann nýggi skúlin skal byggjast. Ætlanin er at nýta arbeiðsvegin sum vegatkomu í sambandi við byggingina av nýggja skúlanum. Tá er brúk fyri at hava neyðugt pláss til at koma við stórum bygningslutum í sambandi við byggingina.

Arbeiðsvegurin er partur av lidna vegaprosjektinum, sum verður sambindingarvegurin til skúlaøkið í Marknagili frá Landavegnum og niðan í Marknagilsvegin. Umsitingin er í gongd við fyrireikingarnar at gera høvuðsprosjekt og at bjóða arbeiðið út.

Arbeiðstakarin Articon P/f hava latið Tórshavnar kommunu tilboð uppá gerð av fyribilsvegnum.

**Fíggjarlig viðurskifti**
Umsitingin hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting grundað á tilboðið frá Artion áljóðandi kr. 2.500.000.

**Viðkomandi skjøl í málinum**

| | |
|---|---|
| TK j. nr. 17/01243-3 | Tilboð frá Articon P/f |
| TK j. nr. 17/01245-1 | Samlað kostnaðarmeting |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla býráðnum til, umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndini, at taka av tilboðnum frá Articon áljóðandi kr. 2.500.000. Játtan til arbeiðið er tøk á verkætlan L81018 Miðstaðarøki í Marknagili.

**Tekniska nevnd 18. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Annfinn Brekkstein, um at beina málið aftur í teknisku nevnd og at vegastubbin verður boðin alment út, ið fall við 5 atkvøðum fyri og 7 atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass og Gunvør Balle

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Heðin Mortensen og Gunvør Balle

Atkvøddi blankt: Annfinn Brekkstein.

# 126/17 Uppskot um marknaumskipan millum matr. nr. 1090 og 1091, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.03.2017 | 42/17 | 17/00649-2 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.04.2017 | 69/17 | 17/00649-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.04.2017 | 92/17 | 17/00649-2 |
| 4 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 126/17 | 17/00649-2 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Umsókn er komin frá eigaranum av matr. 1091 við Velbastaðvegin/Kirkjubøarvegin, um at marknaumskipa matr. 1090 og 1091, fyri at teir kunnu fáa atkomumøguleikar av matr. 1090 til matr. 1091.

Økið talan er um, er ein partur av økinum, sum FT- Net hevur fingið ein part av til at byggja eitt hús og seta eina mastur á, umframt at NCC skal byggja arbeiðsskúrar á.

Umsøkjarin hevur áhuga at finna eina loysn til eina vegatkomu, til teirra stykki matr. 1091, nú kommunan hevur bundi seg nógv ár framyvir til at NCC skal byggja skúrar.

Hjálagt tekning í málinum 17/00649-1, sum vísir hvussu umsøkjarin kundi hugsað sær at frábýtt/marknaumskipa.

Umsøkjarin vísir eisini á ein møguleika, at FT-Net flytur húsið og mastur til trýkantin tann eina partin av matr. 1091 soleiðis, at 1091 far vegatkomu á 1090 har FT-net skal byggja á.

Matr. 1091 hevði upprunaliga góð atkomuviðurskiftir, men tað bleiv deilt í tríggjar partar, tá Kirkjubøarvegurin bleiv gjørdur, omanfyri standandi partur misti atkomumøguleikan.

Sum umstøðurnar eru nú við NCC, má umsøkjarin bíða í eini 7 til 8 ár.

Umsøkjarin hevur fyrr søkt um at marknaumskipa soleiðis, at kommunan fekk ein trýkant oman fyri Velbastaðvegnum og 1091 fekk stykkið móti Velbastaðvegnum til vegatkomu.

Umsóknin var ikki gingin á møti, niðurstøðan í málinum var, at kommunan fór inn at samráðast, um at keypa økið.
Samráðingar vóru við umsøkjarin um at kommunan keypti ein part av matr. 1091, men komu ikki til nakra niðurstøðu.

Á økinum, sum kommuna skal fáa í sambandi við marknaumskipanina, liggur ein byggilinja uppá 25 m frá Landsvegnum, so tað verður ikki so nógv eftir av stykkinum, tá man skal halda seg til byggilinjuna.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í umráðspartinum B3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavn.

**§ 10. Ásetingar fyri umráðispart B3 í 3. grundumráði**
1 Loyvi er einans at byggja hús til smá vinnuvirki, verkstaðir og tílíkt og tænastuvirksemi, ið hava samband við hesi. Tó er loyvt á hvørjum grundstykki at gera bústað til eigara ella fyristøðufólk virkisins.

2 Virkini í hesum umráðispartinum skulu kunna flokkast í umhvørvisflokkunum 2 til 4 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

3 Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 800 $m^2$ og í mesta lagi 2000 $m^2$.

4 Útstykking verður einans loyvd, um hon hóskar við eina útstykkingarætlan, sum byggivaldið hevur góðkent fyri ein náttúrliga avmarkaðan lut av umráðispartinum.

5 Byggistigið fyri grundstykkini má ikki fara upp um 0,5.

6 Rúmmálið á húsinum má ikki fara upp um 2 $m^3$ fyri hvønn $m^2$ av stykkinum.

7 Eingi hús og eingin húsalutur má verða hægri enn 9 m.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Víst verður til málið 14/00615m

**Møgulig frávik/léttar frá ásetingum**
Onki frávik

**Umhvørvisárin**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 3

**Fíggjarlig viðurskifti**
Ongar fíggjarligar bindingar fyri kommununa.

**Viðmerkingar frá øðrum deildum**
Ongar viðmerkingar frá øðrum deildum

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum**
Ongar

**Skjøl**
Umsókn frá eigaranum av matr.17/01649-1
Býráðssamtykt frá 25. juni 2014 gamalt mál j.nr. 14/00615 nýtt mál 17/01649 -3

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til at eigarin av matr. 1091 fær atkomu til sítt stykki frá Velbastaðvegnum, millum stykkini sum NCC og FT-Net hava fingið loyvi at byggja á.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. mars 2017:** Samtykt at umsitingin fer í samráðingar við eigararnar um eina loysn at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur havt ein fundi við umboð fyri eigararnar av matr. 1091, Bjørn Holm.
Umboðini fyri Tórshavnar kommunu vístu fram hjálagda uppskot og Bjørn segði, at hetta uppskotið fara tey at taka undir við, so vit kunnu arbeiða víðari við málinum.

Uppskotið um at marknaumskipa soleiðis:

- Matr.1091 letur umleið 880 fermetrar til matr. 1090.
- Matr.1090 letur umleið 880 fermetrar til matr. 1091.

Bjørn upplýsti, at um Tórshavnar kommuna er áhuga í tríkantinum norðan fyri Kirkjubøarvegin, so eru tey framvegis sinnaði at gera gerðabýti. Hetta mál hevur verið til viðgerðar hjá Tórshavnar kommunu fyrr, og var Tórshavnar kommuna ikki áhugað í hesum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til at viðmæla marknaumskipanina millum matr. 1091 og 1090, sambært kortskjali j.nr. 17/00649-7, soleiðis at matr. 1091 fær vegatkomu frá Velbastaðvegnum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. apríl 2017:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Bergun Kass og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur støðu á seinni fundi.

Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2017:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Bergun Kass og Marin Katrina frýdal taka undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevdini.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Heðin Mortensen og Gunvør Balle.

Atkvøddi blankt: Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson

# 127/17 Býlingavegur millum Blómubrekku og Villingadalsvegin 2. stig (2013-2048)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 10.02.2016 | 16/16 | 16/00460-5 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 76/16 | 16/00460-5 |
| 3 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 51/16 | 16/00460-5 |
| 4 Tekniska nevnd | 29.11.2016 | 111/16 | 16/00460-5 |
| 5 Tekniska nevnd | 04.04.2017 | 25/17 | 16/00460-5 |
| 6 Fíggjarnevndin | 19.04.2017 | 88/17 | 16/00460-5 |
| 7 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 127/17 | 16/00460-5 |

**Málslýsing:**
Nú ið fyrsti partur av býlingavegnum er gjørdur og handaður kommununi, eigur støða at verða tikin til, hvørt haldast skal fram við vegagerð á teimum umleið 120 metrunum, sum eru eftir at gera, frá íbindingini í útstykkingina hjá Sp/f Barni Poulsen, Baraldsgøta og fram til Villingardalsvegin.

Fyrsti partur av vegnum er gjørdur eftir prosjekti frá HMP-consult (j. nr. 2012-1353/1) fyri umleið kr. 14.000,- fyri meturin. Prosjektuppskot frá UP-Verkfrøði tókt (j. nr. 2010-1960/6), fyri tann partin av vegnum, sum eftir er at gera fram til íbinding í Villingardalsvegin.

Eingin kostnaðarmeting er tøk fyri henda seinna partin av vegnum, men av tí at stórur jarðarmunir eru móti grannaognunum á báðum síðum, sum krevja lutfalsliga høgar stuðlamúrar, má roknast við munandi størri metur kostnað enn á undanfarna parti. Við einum meturprísi álj. kr. 21.000,- til 25.000,- verður samlaði kostnaðurin fyri hetta vegastrekkið uppá ca. 130 m mettur til umleið 2,7 til 3,2 mió. kr.

Eftir prosjektuppskotinum, verða eisini umleið 25 ferðmetrar av lendi, at útvega hvørjumegin vegamótið við Villingardalsvegin burturav ávikavist matr. nr. 1363p og matr. nr 1362b. Harumframt nakrir fáir fermetrar av matr. nr. 1362b, Tórshavn.

Mett verður, at tað er umráðandi at fara undir vegaarbeiðið, áðrenn tað verður bygt ov tætt við markið til ætlaða vegin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játtaðar verða kr. 250.000,- av markaðum íløgukørmum fyri vegir í sambandi við viðgerðina av ársfíggjarætlanini fyri 2014 til at gera liðugt prosjekt og útbjóðingartilfar at leggja fyri nevndina aftur, við støði í fyriliggjandi prosjektuppskoti frá UP-Verkfrøði og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 4. september 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Bogi Andreasen og Helena D. á Neystabø luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 13. september 2013:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðið 16. september 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á íløguætlan kommununnar fyri 2016, eru avsettar kr. 2 mió. til dagføring av Sundsvegnum.

Neyðugt er at dagføra Sundsvegin millum verandi rundkoyringar í einum og røkkur nevnda upphædd tí ikki til hesa dagføring.

Av tí at neyðugt verður at steingja Sundsvegin, tá hesin verður dagførdur, kann avsetta upphæddin við fyrimuni verða nýtt til at bøta um trongu ferðsluviðurskiftini, sum gerast millum Vegin Langa og Vestara Ringveg, meðan dagføringararbeiðið fer fram.
Hetta kann gerast við at gera býlingavegin millum Blómubrekku og Villingadalsvegin lidnan, soleiðis at onnur farleið eisini er tøk, meðan Sundsvegurin verður dagførdur.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta 2 mió. kr. av íløgujáttanini fyri 2016 til dagføring av Sundsvegnum (kto. 8175) til at gera liðugt prosjekt at seta í útboð við innbodnari lisitatión, og at beina málið, umvegis fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 10. februar 2016:** Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Sigrun Mohr og Bogi Andreasen, tekur undir við tilmælinum vísandi til at hetta letur upp fyri at fjarhiti sleppur oman í býin.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal, mælir til at dagføra Sundsvegin soleiðis, at fjarhitin kann fáast longur oman í býin og at heita á fíggjarnevndina at útvega størri játtan til endamálið.

Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, tekur undir við meirilutanum í teknisku nevnd og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Jógvan Arge, mælir býráðnum til at taka undir við minnilutanum í teknisku nevnd.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Prosjektuppskot til gerð av býlingavegnum er tøkt frá ráðgeva (sí j.nr. 16/00460-9).
Við støði í nevnda prosjektuppskoti eru grannarnir framvið ætlaða vegnum kunnaðir um vegagerðina og í hvønn mun komið verður inn á teirra øki í sambandi við grevstur o.a. og at nærri skrivligar avtalur verða at gera í hesum sambandi, áðrenn arbeiðið byrjar.

Grannarnir hava havt høvi at gera viðmerkingar til ætlaðu vegagerðina á kunningarfundum og hevur ein av grannunum eftirfylgjandi vent aftur við skrivligari áheitan um at ætlaði vegurin verður broyttur framvið hjá teimum.

Í sambandi við at neyðugt er at umskipa verandi vegamót/atkomu frá Villingadalsvegnum til matriklarnar 1363c, 1363q og 1363r, eru samráðingar við arvingarnar til vegøkið matr. 1363p, um at kommunan yvirtekur vegøkið.

Eisini eru samráðingar við ánararnar av matr. nr. 1363c um marknaumskipan í sambandi við ætlaða nýggja vegamótið móti Villingadalsvegnum.

Tekniska nevnd 29. november 2016: Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Avtalur um lendi til vegagerðina eru fingnar í lag og hevur ráðgevi vegna kommununa sett arbeiðið at gera býlingavegin í útboð til hesar arbeiðstakarar:

- Articon P/f
- J&K Petersen P/f
- TG-Verk P/f
- Andrias Berg Sp/f
- Maskinkoyring Sp/f

Tilboð og tilmæli verða tøk til nevndarfundin tann 4. apríl 2017.

Tríggir arbeiðstakarar lótu inn tilboð uppá arbeiðið at gera býlingavegin og vóru tilboðsupphæddirnar hesar:

- Articon P/f kr. 3.987.914.-
- Andrias Berg Sp/f kr. 3.975.817,-
- Maskinkoyring Sp/f kr. 5.608.030,-

Ráðgevi kommununnar, Sp/f Ráð hevur eftirkannað tilboðini og mælir til at taka av lægsta tilboðnum, sum er frá Sp/f Andrias Berg.

Við støði í tilboðnum frá Andrias Berg Sp/f hevur umsitingin mett samlaða kostnaðin fyri vegagerðina til kr. 5.589.979,-, tá MVG, trygging, óvæntað v.m. er íroknað (j.nr. 16/00460-16).

Tøk játtan til verkætlanina er kr. 1.890.000,- og íresta tí kr. 3.700.000,- fyri at farast kann undir vegagerðina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játtaðar verða kr. 3.700.000,- afturat til verkætlanina av íløgukarminum til vegir í 2017, at heimila verður umsitingini at gera sáttmála við Andrias Berg Sp/f um gerð av arbeiðinum og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 04. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Einmælt samtykt.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Heðin Mortensen og Gunvør Balle.

# 128/17 Serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 1116a, 1118a og 1118b undir Gráasteini, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.02.2017 | 35/17 | 17/00503-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.03.2017 | 61/17 | 17/00503-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.03.2017 | 106/17 | 17/00503-1 |
| 4 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 128/17 | 17/00503-1 |

**Málslýsing:**
Eigarin av omanfyri nevndu ognum hevur vent sær til kommununa við einum uppskoti til útstykkingarætlan fyri matr. nr. 1118a og 1118b undir Gráasteini í Tórshavn.

Talan er um eina útstykking við 12 grundstykkjum, umframt núverandi sethús á ognini. Grundstykkini eru millum 405 og 490 m$^2$ til víddar.

Vegatkoman til grundstykkini er frá trimum ymiskum vegum. Harumframt er eitt fríøki á 811 m$^2$ til víddar.

Gøtur eru ætlaðar at samanbinda grundstykkini. Hesar skulu verða í minsta lagi 2 m breiðar, vísandi til almennu byggisamtyktina, Kap. V. § 2. stk. 1 d. Tekniskar leiðingar skulu liggja har gøturnar eru.

Ognirnar liggja í A1 øki í 3. Grundumráðið, ætlað til sethús, tvíhús og raðhús. Av tí at grundstykkini eru minni enn 500 m$^2$ til støddar, má ein serstøk byggisamtykt gerast fyri at loyva útstykkingini.

Býarskipanardeildin hevur gjørt eitt uppskot til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 1118a og 1118b, Tórshavn.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 1118a og 1118b og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. februar 2017:** Útsett.

**Ískoyti:**
Málið er broytt til eisini at viðvíkja matr. nr. 1116a undir Gráasteini, Tórshavn, soleiðis at tað er ein samlað serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 1116a, 1118a og 1118b undir Gráasteini, Tórshavn.

Talan er um eina útstykking við 12 grundøkjum til stakhús, 2 til tvíhús, 5 til raðhús, fríøki, núverandi sethús á matr. nr. 1118b og felags parkeringspláss, og skulu hesi skipast sum sýnt er á kortskjali 1.

Ognirnar liggja í A1 øki í 3. grundumráðið í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum er ætlað sethúsum, tvíhúsum og raðhúsum. Av tí at grundøkini eru minni enn 500 m$^2$ til støddar, má ein serstøk byggisamtykt gerast fyri at loyva útstykkingini.

Býarskipanardeildin hevur gjørt eitt uppskot til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 1116a, 1118a og 1118b, Tórshavn.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 1116a, 1118a og 1118b, Tórshavn og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. mars 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.
Gunvør Balle luttók ikki í viðgerðini av málinum

**Býráðsfundur 30. mars 2017:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Málið beint aftur í byggi- og býarskipanarnevndina.

# 129/17 SEV: Umsókn um lendi og broyting av byggisamtykt til víðkan av Sundsverkinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 125/16 | 16/01392-2 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.04.2016 | 129/16 | 16/01392-2 |
| 3 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 150/16 | 16/01392-2 |
| 4 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 212/16 | 16/01392-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 334/16 | 16/01392-2 |
| 6 Fíggjarnevndin | 16.11.2016 | 371/16 | 16/01392-2 |
| 7 Býráðsfundur | 30.11.2016 | 321/16 | 16/01392-2 |
| 8 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 416/16 | 16/01392-2 |
| 9 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 34/17 | 16/01392-2 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.03.2017 | 64/17 | 16/01392-2 |
| 11 Kaldbaksnevndin | 29.03.2017 | 5/17 | 16/01392-2 |
| 12 Vinnunevndin | 03.04.2017 | 18/17 | 16/01392-2 |
| 13 Fíggjarnevndin | 19.04.2017 | 89/17 | 16/01392-2 |
| 14 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 129/17 | 16/01392-2 |

**Málslýsing:**
SEV hevur í hyggju at sleppa ætlanini um at víðka Sundsverkið eystureftir men ætlar í staðin at víðka verki vestureftir, um ræði fæst á neyðuga lendinum har og um neyðug loyvi fáast til útbyggingina á hesum stað.

Í hesum sambandi søkir SEV um at keypa umleið 8-10.000 $m^2$ av matr. nr. 4c, eystanfyri verandi verk, fyri at kunna fremja ætlaðu útbyggingina. Øki er merkt “A” á kortinum frá SEV.

Harumframt søkir SEV um at fáa option uppá at keypa restina av matr. nr. 4c, umleið 22.000 $m^2$, til komandi orkuendamál. Økið er merkt “B” á kortinum frá SEV.

Í sambandi við ætlanina má byggisamtyktin fyri økini A og B broytast.

Sp/f Sundsneystini og Tórshavnar kommuna gjørdu í september 2008 leigusáttmála um sama øki, matr. 4c, (j. nr. 14/02723). Ætlanin er at byggja umleið 100 neyst við tilhoyrandi útgerð og havnaviðurskiftum.

Ísv. mál um útbygging og dagføring av Sundsverkinum, j. nr. 2012-0377, var ætlanin, at makaskifti við gamla el-verki í Gundadali skuldi vera ein partur av málinum. Av tí hetta ikki lat seg gera tá varð samtykt, at í einari søluavtalu við Sev at gera avtalu um at venda aftur til upprunaligu ætlanina um makaskifti fyri restina av lendinum við gamla el-verkið í Gundadali, tá SEV hevur funnið onnur hóskandi hølir at flyta virksemið í Gundadali í.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til at beina málið í byggi- og býarskipanar-nevndina og vinnunevndina.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Jógvan Arge, mælir til at bíða við støðutakan til umsóknina frá SEV, til viðurskiftini við Sundsneystini eru avgreidd.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Vísandi til samtykt hjá Fíggjarnevndini 13. apríl 2016 um broyting av almennu byggisamtyktini fyri øki inni á øki eystan fyri Sundsverkið frá E-øki til B9 øki, hevur býarskipanardeildin gjørt uppskot til broyting av byggisamtyktini.

Í sambandi við ætlanirnar at byggja neyst á matr. nr. 4c á Sundi, var serstøk byggisamtykt gjørd fyri skipan av økinum til byggjan av neystum og bátadrátti. Serstaka byggisamtyktin var góðkend av Innlendismálaráðnum tann 15. juli 2011. Við nýggju ætlanunum við økinum má serstaka byggisamtyktin avlýsast.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu verður broytt sambært hjáløgdu kortum, dagf. 19.04.2016, og avlýsa serstøku byggisamtyktina fyri matr. nr. 4c á Sundi og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. apríl 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
SEV hevur við skrivi frá 18. mai 2016 sent Tórshavnar kommunu endurskoðaða umsókn um keyp ella optión til lendi á Sundi til framtíðar útbyggingar.

Talan er í fyrsta lagi um umsókn um keyp av lendi til aktuellu útbyggingina, og er talan um eitt øki á uml. 9.000 m².

Í øðrum lagi er talan um umsókn um lendi til komandi orkuendamál. Talan er um lendi, sum tørvur er á til orkuendamál sum fráliður, og er víddin á hesum lendi uml. 22.000 m². Søkt verður í fyrsta lagi um at keypa hetta økið frá Tórshavnar kommunu, ella í øðrum lagi um at fáa forkeypsrætt til hetta økið.

Í triðja lagi er talan um lendi fram við sjóvarmálanum, sum ætlanin er at víðka um við uppfylling, og sum SEV er áhugað at keypa.

Í fjórða lagi ynskir SEV, at støða verður tikin til økið til tangagarðin, ið SEV við avtalu frá 3/10 2013 hevur ein fimm ára brúkssáttmála um. Sambært avtaluni kann SEV keypa økið í fimm-ára tíðarskeiðinum, ið avtalan gongur, ella í seinasta lagi, tá brúksavtalan gongur út. SEV ynskir, at viðurskiftini viðvíkjandi hesum øki verða avklárað samstundis, sum støða verður tikin til hini økini, ið felagið er áhugað at ogna sær.

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla fíggjarnevndini til at beina málið í bygg- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Uppskotið um broyting av byggisamtyktini, sum var samtykt av býráðnum 19. mai 2016, hevur ligið frammi til almenna hoyring og eingin viðmerking ella mótmæli er móttikið. Broytingin er send Heilsu- og Innlendismálaráðnum til endaliga góðkenning.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Kunnað varð um málið og verður málið beint í byggi- og býarskipanarnevndina við atliti til at viðgera umsóknina frá SEV.

**Ískoyti:**
Broytingin av byggisamtyktini var endaliga góðkend av Heilsu- og Innlendismálaráðnum tann 7. oktober 2016 (j.nr. 16/01392-17).

Umsókn frá SEV, dagfest 18. mai 2016**,** um keyp av 9.000 $m^2$ til aktuellu útbyggingina, keyp ella forkeypsrætt til 22.000 $m^2$ til komandi orkumál, øki fram við sjóarmálanum sum ætlanin er at víðka við uppfylling og ynski um støða verður tikin til økið við tangagarðin, ið SEV við avtalu frá 3/10 2013 hevur fimm ára brúkssáttmála um.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, Tekniski stjórin, býararkitekturin og leiðarin á løgdeildini mæla nevndini til at viðmæla:

- at selja 9.000 $m^2$ til aktuellu útbyggingina
- at selj 22.000 $m^2$ til komandi orkumál
- at selja økið fram við sjóarmálanum
- at selja økið við tangagarðin
- við treyt um, at Tórshavnar kommuna fær forkeypsrætt til at keypa økini aftur,um viðurskiftini hjá SEV viðv. nýtsluni av økjunum verður broytt í framtíðini.
- at loyva umsitingini – um neyðugt – at arbeiði viðvíkjandi spreinging og planering kann byrja á kommunalum øki, áðrenn allir myndugleikar hava givið sítt samtykki, tó uppá egna ábyrgd hjá SEV.
- At nú verkætlanin er góðkend av Byggi- og býarskipanarnevndini, at fara undir samráðingar við SEV um lendi, herundir meta um makaskifti framvegis skal vera partur av málinum.
  at beina málið aftur til fíggjarnevndina umvegis vinnunevndina.

**Fíggjarnevndin 16. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við teirri broyting, at SEV fær nýtslurætt til teir omanfyrinevndu 22.000 $m^2$ og sjóvarmálan í tíðarskeiðinum, tað er neyðugt í sambandi við aktuellu útbyggingina, og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. november 2016:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**
Samráðingar eru við SEV viðvíkjandi søluni av teimum 9.000 m2, men enn eru partarnir ikki komnir á mál.

Viðvíkjandi upprunaligu ætlanini um, at gamla EL-verki í Gundadali skuldi vera ein partur av søluni av lendinum Sundi, so hevur SEV boðað frá, at SEV framhaldandi hevur tørv á økinum í Gundadali og tí ikki er sinnað at makaskifta.

**Tilmæli:**

Tilfar kemur til fundin

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Tilfar kemur til fundin

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Ætlanirnar hjá SEV eru nú meira ítøkiligar og tað vísir seg, at SEV hevur tørv á meira lendi á Sundi til orkuendamál enn upprunaliga mett. SEV hevur tí latið kommununi nýggja umsókn, har felagið søkir um at keypa alt matr. nr. 4c á Sundi, ið er 30.853 $m^2$ til víddar, til orkuendamál. Tó fer kommunan ísv. søluna at tryggja sær sjóvarmálan.

Í mun til uppruna projektið (Støð 3), umfatar víðkanin í høvuðsheitum øki til:

1. Koblingsstøð (uml. 3.366 $m^2$).
2. Battarístøð og aðrar nettøkni, ið við fyrimuni kann staðsetast tætt við netknútapunktið á Sundi (uml. 1.626 $m^2$).
3. Pumpur, vekslarar og hitagoymslur fyri at gagnnýta avlopshita frá Sundsverkinum (uml. 3.000 $m^2$).

SEV hevur í sambandi við málið játtað at lata kommununi lendið, ið felagið eigur fram við sjóvarmálanum á Sundi, leysliga mett til einar 1.300 $m^2$. Hetta tó við ávísum treytum, m.a. at SEV framhaldandi kann hava, leggja nýggjar og viðlíkahalda neyðugar leiðingar, ið ganga út á sjógv. Ognarskifti verður framt sum makaskifti, fermetur fyri fermetur á Sundi.

Viðvíkjandi upprunaligu ætlanini um, at gamla EL-verkið í Gundadali skuldi vera ein partur av søluni av lendinum Sundi, so hevur SEV boðað frá, at SEV framhaldandi hevur tørv á økinum í Gundadali og tí ikki er sinnað at makaskifta.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og leiðarin á løgdeildini mæla nevndini til at viðmæla:

1. at selja alt matr. nr. 4c á Sundi til orkuendamál
2. at selja økið við tangagarðin
3. at kommunan við servitutti tryggjar sær, at um av matr. nr. 4c ella partar av hesum ikki verða brúktir, so kann kommunan krevja óbrúkta økið afturskeytað.
4. at kommunan ognar sær sjóvarmálan "undir" EL-verkinum á Sundi
5. at kommunan í sambandi við søluna tryggjar vegakomu til fjøruna og møguliga framtíðar menning í økinum
6. at EL-verkið í Gundadali ikki verður partur av hesum máli.
   at beina málið aftur í fíggjarnevndina umvegis vinnunevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. mars 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í vinnunevndina og fíggjarnevndina.
Gunvør Balle luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Kaldbaksnevndin 29. mars 2017:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**

Kommunustjórin upplýsir st tað er SEV sum ger vegin sí punkt 5.

**Vinnunevndin 03. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Ískoyti**

**Ískoyti**

Kommunan letur hesi øki til SEV:

- Matr. nr. 4C ið er 30.853 m2 til víddar
- Øki til tangagarðin, ið er gjørdur, ið er umleið 1.020 m2

Tilsaman 31.873 m2.

Hinvegin letur SEV kommununi øki fram við sjóvarmálanum, umleið 1.300 m2.

Netto (tá makaskifti er framt) er talan um, at kommuan selur umleið 30.573 m2 til SEV fyri 230 kr/m2.

3 skeytisuppskot eru í málinum, j.nr. 16/01392- 54, 55 og 56 og kort ið vísa umrøddu økini, j.nr. 16/01392 - 57.

Tilmæli
Kommunustjórin og løgdeildarleiðarin mæla til at góðkenna makaskifti og søluna sambært samtyktum treytum.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Einmælt samtykt at Marin Katrina Frýdal ikki luttók í viðgerðini av málinum.

Einmælt samtykt.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Heðin Mortensen og Gunvør Balle.

# 130/17 Uppskot til víðari framferð av húsinum í Brekkugrund

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.04.2017 | 76/17 | 17/01099-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.04.2017 | 86/17 | 17/01099-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 130/17 | 17/01099-1 |

**Málslýsing:**
Húsaumsitingin hevur arbeitt við uppskoti til ætlan fyri arbeiðið at umvæla ognina á Bringsnagøtu 13, matr. nr. 120, Tórshavn.

Umvælingarnar av hesari ognini eru nógv størri enn væntað, so at siga alt húsið er rotið og skal gerast av nýggjum.

Vit hava arbeitt við tveimum loysnum, umvæling og byggjan av nýggjum.

Umvæling krevur, at útveggir verða gjørdir av nýggjum, har eru ongar konstruktiónir, sum bera ella stabilisera húsið. Sperrurnar í takinum skulu skiftast. Alt inni í húsinum skal gerast av nýggjum, tí tað er rotið. Gólvið skal gravast upp, og har má drenast bæði úti og inni. Við hesi loysn fáa vit ikki ein gott hús, og umvælingar mugu eisini gerast uttan, innan ikki ov leingi.

Hetta arbeiði kostar umleið 400.000,- kr. og tekur umleið 2-3 mánaðir. Sí frágreiðing dagfest 8. mars 2017.

Nýtt hús krevur, at húsið verður tikið niður, nýtt byggiloyvið og hoyring frá Reynanevndini. Húsið verður bygt uppaftur í saman sniði.

Hettar arbeiði kostar umleið 500.000,- og tekur umleið 4-5 mánaðir.

Húsaumsitingin hevur ikki sett pengar av til hesa umvæling í 2017.

Umsitingin er vitandi um at ynski er at fáa fleiri fólk at búgva økinum. Tí verður mælt til, at verður ognin seld, eigur bústaðarskylda at vera lýst í skeytinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Húsaumsitingini mæla til at nevndin tekur undir við at ognin verður seld og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. apríl 2017:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Bergun Kass, Bogi Andreasen og Helena D. á Neystabø, samtykti at taka undir við tilmælinum og at bústaðarskylda verður lýst í skeytinum, tá ognin verður seld.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2017:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass, tekur undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, vísir til støðu sína í byggi- og býarskipanarnevndini 5. apríl 2017.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Marin Katrinu Frýdal, um at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina, ið varð einmælt samtykt

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Heðin Mortensen og Gunvør Balle

# 131/17 Fíggjarætlan 2017

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 166/16 | 16/01873-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 25.05.2016 | 153/16 | 16/01873-1 |
| 3 Trivnaðarnevndin | 30.05.2016 | 33/16 | 16/01873-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 01.06.2016 | 42/16 | 16/01873-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 01.06.2016 | 68/16 | 16/01873-1 |
| 6 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 07.06.2016 | 45/16 | 16/01873-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2016 | 167/16 | 16/01873-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 15.06.2016 | 171/16 | 16/01873-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 300/16 | 16/01873-1 |
| 10 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 238/16 | 16/01873-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 09.09.2016 | 306/16 | 16/01873-1 |
| 12 Trivnaðarnevndin | 26.09.2016 | 42/16 | 16/01873-1 |
| 13 Byggi- og býarskipanarnevndin | 30.09.2016 | 222/16 | 16/01873-1 |
| 14 Vinnunevndin | 03.10.2016 | 35/16 | 16/01873-1 |
| 15 Tekniska nevnd | 11.10.2016 | 91/16 | 16/01873-1 |
| 16 Tilbúgvingarnevndin | 06.10.2016 | 1/16 | 16/01873-1 |
| 17 Mentamálanevndin | 05.10.2016 | 240/16 | 16/01873-1 |
| 18 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 06.10.2016 | 54/16 | 16/01873-1 |
| 19 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 308/16 | 16/01873-1 |
| 20 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 284/16 | 16/01873-1 |
| 21 Trivnaðarnevndin | 17.10.2016 | 49/16 | 16/01873-1 |
| 22 Mentamálanevndin | 17.10.2016 | 260/16 | 16/01873-1 |
| 23 Fíggjarnevndin | 25.10.2016 | 363/16 | 16/01873-1 |
| 24 Fíggjarnevndin | 14.11.2016 | 366/16 | 16/01873-1 |
| 25 Býráðsfundur | 16.11.2016 | 290/16 | 16/01873-1 |
| 26 Býráðsfundur | 30.11.2016 | 318/16 | 16/01873-1 |
| 27 Fíggjarnevndin | 29.11.2016 | 399/16 | 16/01873-1 |
| 28 Fíggjarnevndin | 18.01.2017 | 12/17 | 16/01873-1 |
| 29 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 89/17 | 16/01873-1 |
| 30 Býráðsfundur | 26.01.2017 | 57/17 | 16/01873-1 |
| 31 Fíggjarnevndin | 19.04.2017 | 99/17 | 16/01873-1 |
| 32 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 131/17 | 16/01873-1 |

**Málslýsing:**
Uppskot á greinastøði til fíggjarætlanina 2017 verður lagt fram.

**Tilmæli:**

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við uppskotinum.

**Ískoyti:**
Við støði í samtykt fíggjarnevndarinnar 11. mai 2016 og samtyktu tíðarætlanini í máli 16/01224 - FÆ 2017 – tíðarætlan skulu faknevndirnar viðgera uppskot til rakstrar- og íløguætlan fyri 2017. Málið verður lagt fyri mentamálanevndina at umrøða og kemur til aðru umrøðu á fundi í juni. Í samtyktini hjá fíggjarnevndini er lagt upp til, at grein 4 og 5 fáa eina framskriving á 1,8%. Hetta svarar til áleið lønarhækkingar í 2017, sum eru uml. 1,9%.
Hjálagt (skjølini koma á nevndarportalin mánadagin) er yvirlitsskjal (skjal 1) fyri grein 4 (fólkaskúlaøkið) og grein 5 (mentanar- og ítróttaøkið), umframt viðmerkingar til einstøku konturnar, ið greina týðandi viðurskifti í sambandi við uppskotið, umframt nærri frágreiðing um møguligar upp- og niðurraðfestingar hjá nevndini at umrøða og meta um.

Á nevndarfundinum fara trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin at gjøgnumganga uppskotið til fíggjarætlan fyri ymisku konturnar. Uppskotini eru m.a. gjørd við støði í fíggjarætlan fyri 2016, mál- og avriksavtalum fyri grein 5 stovnarnar, dialogfundum við leiðslurnar vm. Talan er um stovnar vm. við ymiskum virksemi og ymiskum stevnumiðjum. Í sambandi við fíggjarætlan er týdningarmikið at gera sær greitt, hvussu mett verður um, í hvønn mun stovnar náa settum stevnumiðjum og hvussu til ber at menna indikatorar fyri tað og í øðrum lagi, hvat krevst fyri at gera tað enn betri innan bæði tænastu og rakstur og innan hvønn tíðarkarm!

Umsitingin fer síðani við støði í viðgerðini og viðmerkingunum hjá nevndini á fundinum at gera enn eitt dagført uppskot til nevndarviðgerð í juni. Hareftir verða uppskotini løgd inn í samlaðu fíggjarætlanina, ið aftur kemur til nevndarviðgerð í heyst áðrenn endaligu viðgerðina í býráðnum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til:
a). at umrøða uppskotið til fíggjarætlan fyri einstøku konturnar hjá stovnum og øðrum virksemi og
b). at umrøða verandi ella nýggj stevnumið fyri einstøku økini innan rakstur og íløgur,
c). at umrøða møguligar umraðfestingar innan karmin fyri einstøku greinarnar og hvussu hesar kundu verið framdar.

**Mentamálanevndin 25. mai 2016:** Umrøtt.

**Trivnaðarnevndin 30. mai 2016:** Umrøtt.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 01. juni 2016:** Útsett.

**Tekniska nevnd 01. juni 2016:** Umrøtt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2016:** Umrøtt.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 07. juni 2016:** Umrøtt.

**Ískoyti**
Hjálagt sum fylgiskjal í nevndarportalinum er frágreiðing viðv. grein 3 – Børn og ung. Á fundinum verður framløga um viðurskiftini sum har eru umrødd.

Innan grein 4 og 5 er gjørd nýggj uppseting og dagføring av skjølunum (sí fylgiskjal "Fíggjarætlan grein 4 og 5" og fylgiskjal "Viðmerkingar til einstøku høvuðskonturnar fíggjarætlan 2017" á nevndarportalinum. Á fundinum verður framløga um útvald viðurskifti í skjalinum og annars framhald av viðgerðini og tilmælinum frá fundinum 25. mai 2016.

**Mentamálanevndin 15. juni 2016:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Fíggjarnevndin skal fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið. Kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. Desember 2016.
Tilfar kemur áðrenn fundin.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Útsett.

**Ískoyti:**
Arbeitt er við uppskotinum til fíggjarætlan 2017 at leggja fyri fíggjarnevndina. Fortreytirnar fyri uppskotinum er, at skattaprosenti verður verandi á sama støði. Skattaprosentið lækkaði frá 20,25% til 19,75% í 2016. Barnafrádrátturin verður framhaldandi 8.000 kr. Hædd er tikið fyri lønarvøkstri og virksemisbroytingum annars. Í talvuni niðanfyri eru høvuðstølini býtt upp á greinar, tølini eru undantikið Tórshavnar Havn.

**Uppskot á greinastøði 2017**

| | Roknskapur 2015 | Ætlan 2016 | Reg. ætlan juli | Ætlan 2017 | Broyting pct. FÆ16-FÆ17 | Broyting kr. FÆ16 - FÆ17 | Broyting pct. RFÆ16-FÆ17 | Broyting kr. RFÆ16 - FÆ17 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Inntøkur** | | | | | | | | |
| Kommunuskattur | 705.075 | 679.818 | 679.818 | 717.766 | 5,6% | 37.948 | 5,6% | 37.948 |
| Felagsskattur | 30.438 | 20.000 | 20.000 | 20.000 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 |
| Húsaleiguskattur | 1.680 | 2.000 | 2.000 | 2.000 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 |
| Skattur av eftirlønarinngjøldum | 101.653 | 106.122 | 106.122 | 106.122 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 |
| DIS, FAS, og frádráttir | 34.301 | 35.507 | 35.507 | 35.507 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 |
| Tíðaravmarkað flyting til eldraøkið | 8.916 | 4.866 | 4.866 | 0 | -100,0% | -4.866 | -100,0% | -4.866 |
| **Inntøkur tilsamans** | **882.063** | **848.313** | **848.313** | **881.395** | 3,9% | **33.082** | 3,9% | **33.082** |
| **Rakstur** | | | | | | | | |
| §1 Kommunal fyrisiting | 76.781 | 78.519 | 79.831 | 79.466 | 1,2% | 947 | -0,5% | -365 |
| §2 Almanna- og heilsumál | 202.275 | 194.192 | 206.021 | 214.177 | 10,3% | 19.985 | 4,0% | 8.156 |
| §3 Børn og ung | 139.802 | 150.338 | 150.415 | 156.590 | 4,2% | 6.252 | 4,1% | 6.175 |
| §4 Undirvísing | 38.641 | 39.096 | 41.200 | 41.310 | 5,7% | 2.214 | 0,3% | 110 |
| §5 Mentan og frítíð | 44.933 | 46.197 | 44.087 | 47.944 | 3,8% | 1.747 | 8,7% | 3.857 |
| §6 Teknisk mál | 115.934 | 111.770 | 119.545 | 112.732 | 0,9% | 962 | -5,7% | -6.813 |
| §7 Kommunal virkir | 54.770 | 56.754 | 61.529 | 59.135 | 4,2% | 2.381 | -3,9% | -2.394 |
| **Rakstur tilsamans** | **673.136** | **676.866** | **702.628** | **711.354** | 5,1% | **34.488** | 1,2% | **8.726** |
| **Aðrar útreiðslur** | | | | | | | | |
| Stuðul til rentuútreiðslur | 18.245 | 21.000 | 21.000 | 20.000 | -4,8% | -1.000 | -4,8% | -1.000 |
| Aðrar útreiðslur | 2.295 | 2.000 | 2.185 | 2.029 | 1,5% | 29 | -7,1% | -156 |
| **Aðrar útreiðslur tilsamans** | **20.540** | **23.000** | **23.185** | **22.029** | **-4,2%** | **-971** | **-5,0%** | **-1.156** |
| **Úrslit áðrenn rentur** | **188.387** | **148.447** | **122.500** | **148.012** | **-0,3%** | **-435** | **21%** | **25.512** |
| **Rentur** | | | | | | | | |
| Rentuútreiðslur | 5.583 | 8.869 | 8.869 | 8.800 | -0,8% | -69 | -0,8% | -69 |
| Rentuinntøkur | 123 | 300 | 300 | 100 | -66,7% | -200 | -66,7% | -200 |
| **Rentu útreiðslur tilsamans** | **5.461** | **8.569** | **8.569** | **8.700** | **1,5%** | **131** | **1,5%** | **131** |
| **Úrslit av rakstri** | **182.926** | **139.878** | **113.931** | **139.312** | **0%** | **-566** | **22%** | **25.381** |

Samlaðu inntøkurnar vaksa við 3,9% frá 848 mió. kr. til 881 mió. kr. ella 33 mió. kr. inntøkurnar frá kommunuskatturin hækka 5,6% í mun til fíggjarætlan 2016. Í mun til framrokning frá TAKS 31.08.2016 er løgd ein hækking inn á 2%.

Í uppskotinum til fíggjarætlan 2017 hækka rakstrarútreiðslurnar 5,1% frá 677 til 711 mió. kr. Í mun til reguleraða fíggjarætlan 2016 er broytingin 1,2%. Hædd er tikið fyri lønarhækkan, sum stendur fyri einum munandi parti av vøkstrinum í 2017. Størsta hækkingin annars er innan Almanna- og heilsumál. Játtanin er ætlað heilsu- og umsorganartænastuni. Játtanin á barnaansingar- og undirvísingarøkinum fylgir barnatalinum, sum væntandi er hægri í 2017. Eisini er tikið hædd fyri, at samtykt var at broyta sysktinaavsláttурin í 2016. Hækkingin fyri kommunal virkir skyldast í størstan mun sáttmálabundnum broytingum.

Við hesum fyritreytum er úrslit áðrenn íløgur og avdráttir góðar 139 mió. kr. fyri Tórshavnar kommunu í 2017.

Uppskot til fíggjarætlan fyri Tórshavnar Havn er løgd fyri vinnunevndina. Sambart uppskotinum verða samlaðu rakstrarútreiðslur 27,9 mió. kr. og samlaðu inntøkur 59,6 mió. kr. Nettoútreiðslujáttanin verður 31,6 mió. kr. Íløgujáttanin fyri 2017 er 160 mió. kr.

Sambart kommunstýrislógini § 39 skal fíggjarnevndin fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið.

**Fíggjarnevndin 09. september 2016:** Samtykt at leggja fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Framlagt.

**Trivnaðarnevndin 26. september 2016:** Framlagt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. september 2016:** Nevndin staðfestir, at tørvur er á at hækka játtanina til viðlíkahald av bygningum.

**Ískoyti:**
Á fundinum koma trivnaðarstjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og mentamálaleiðarin at greiða frá høvuðsspurningum innan grein 3, 4 og 5.

**Vinnunevndin 03. oktober 2016:** Framlagt.

**Mentamálanevndin 05. oktober 2016:** Umrøtt.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 06. oktober 2016:** Nevndin staðfestir, at tørvur er á at hækka játtanina til kloakkir, renovasjón og tyrving umframt at hækka konto 6610 Umhvørvistiltøk o.a. í sambandi við umhvørvispolitikkin.

**Tilbúgvingarnevndin 06. oktober 2016:** Mælir til at játta kr. 880.000,00 til viðlíkahald av bygningum í Nólsoy og Tórshavn. Samtykt at sløkkiliðið ger uppskot til skipan av skorsteinsreinsan í kommununu.

**Tekniska nevnd 11. oktober 2016:** Nevndin staðfestir, at tørvur er á at hækka játtanina til kloakkir, avleiddar íløgur í vegakervið í sambandi við Innkomuvegin, íløgur í vegakervið í vestari parti av býnum í sambandi við Glasir, viðlíkahald av øðrum vegum, íløgur í útbygging av samferðslukervi til súkklubreytir og aðrar tekniskar veitingar hjá kommununi. Víðari vísur nevndin á týdningin av at halda fram við gongdini um orkusparandi tiltøk innan bæði vatn og gøtuljós fyri at tálma framtíðar útreiðslunum.

**Trivnaðarnevndin 17. oktober 2016:** Nevndin vísir til skjal nr. 19 í málinum og mælir til at raðfesta játtan kr. 5,5 mió til fleiri tænastur og tilboð til heilsu- og umsorganartænastuna. Nevndin vísir eisini á skjal nr. 7 í málinum og mælir til, at Lopfjølin heldur fram og játta verða kr. 450.000 til endamálið.

**Mentamálanevndin 17. oktober 2016:** Nevndin mælir til at uppraðfesta dagstovnaøkið við 3-4 mió kr. eitt nú til serstakan fíggjarleist fyri smæstu stovnarnar, smærri bygningstillagingar konta 3214, fyribyrgjandi verkætlan (TÍT), og betra ungdómsklubbavirksemið.

**Ískoyti:**
Viðvíkjandi inntøkum hevur TK fingið dagførd tøl síðani seinasta fund. Uppskot til broytingar sambært dagførdum tølum (sí talvu niðanfyri) er ein framskriving av Kommunuskattinum við 2% í mun til seinastu meting, sum er komin frá TAKS. Grundað á, at gongdin í felagsskattinum seinastu árini hevur verið hækkandi, er ráðiligt at hækka felagsskattin við 2 mió. kr. Afturbering í samband við eldraøkið er sambært tølum frá FMR. Viðvíkjandi rentuútreiðslum, er hædd tikið fyri verandi lánum, 50 mió. kr., sum áður samtyktar og, at helvtin av íløguni í skúlanum av Fløtum verður láni fíggjaður. Harumframt er hædd tikin fyri verandi lága rentustøði.

| | Uppskot | Dagførd meting | Broyting |
|---|---|---|---|

| | 2017 | 2017 | |
|---|---|---|---|
| *1.000 kr.* | | | |
| Inntøkur | | | |
| Kommunuskattur | 717.766 | 715.962 | -1.804 |
| Felagsskattur | 20.000 | 22.000 | 2.000 |
| Skattur av eftirlønarinngjøldum | 106.122 | 110.967 | 4.845 |
| DIS, FAS, og frádráttir | 35.507 | 34.972 | -535 |
| Inntøkur tilsamans | 879.395 | 883.901 | 4.506 |
| Rentur | | | |
| Rentuútreiðslur | 8.800 | 6.500 | 2.300 |
| | | | |
| Broyting tilsamans | | | 6.806 |

**Tilmæli**
Fyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla til at taka støðu til fyriliggjandi fíggjarætlan og broytingum sambært niðanfyristandandi. Eisini verður mælt til at taka støðu til nevndarviðgerðirnar.

# Yvirlit

## Høvuðsyvirlit

| **Høvuðsyvirlit yvir fíggjarætlan** | | | **2017** |
|---|---|---|---|
| | **Rakstraræætlan** | | **Løguætlan** |
| Túsund kr. | Útreiðslur | Inntøkur | Útreiðslur |
| **§ 1. Kommunal fyrisiting** | **79.466** | **-** | **-** |
| 11. Felagsútreiðslur | 76.567 | - | - |
| 18. Almenn starvsfólk v.m. | 2.899 | - | - |
| **§ 2. Almanna- og heilsumál** | **214.177** | **-** | **1.500** |
| 20. Heilsumál | 18.141 | - | - |
| 21. Almannamál | 196.036 | - | 1.500 |
| **§ 3. Børn og ung** | **156.590** | **-** | **-** |
| 24. Mentan | 7.772 | - | - |
| 26. Barnaansing | 148.818 | - | - |
| **§ 4. Undirvísing** | **41.310** | **-** | **80.075** |
| 23. Útbúgving og gransking | 41.310 | - | 80.075 |
| **§ 5. Mentan og frítíð** | **47.944** | **-** | **22.500** |
| 23. Útbúgving og gransking | 11.161 | - | - |
| 24. Mentan | 36.783 | - | 22.500 |
| **§ 6. Teknisk mál** | **112.732** | **-** | **8.000** |
| 11. Felagsútreiðslur | 50.119 | - | 3.000 |
| 24. Mentan | 2.917 | - | - |
| 30. Umhvørvi | 18.201 | - | 5.000 |
| 38. Samferðsla og samskifti | 41.495 | - | - |
| **§ 7. Kommunal virki** | **27.510** | **-** | **160.000** |
| 30. Umhvørvi | 19.275 | - | - |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 31. Tilbúgving | 9.394 | - | - |
| 37. Handil og vinna annars | 5.217 | - | - |
| 38. Samferðsla og samskifti | -6.376 | - | 160.000 |
| **Tilsamans** | **679.729** | **-** | **272.075** |
| § 20. 22. Íbúðarmál | 20.000 | - | - |
| § 20. 50. Rentur | 8.700 | - | - |
| § 20. 52. Skattir og avgjøld | 2.030 | 881.395 | - |
| Tilsamans | 710.459 | 881.395 | 272.075 |
| **Yvirskot** | **-** | **170.936** | **-** |
| **Rakstrar-, løgu- og útlánsætlan RLÚ** | **-** | **-101.139** | **-** |
| § 25. 62. Afturgjald av skuld | 17.939 | - | - |
| **Bruttokassaúrslit** | **17.939** | **-101.139** | **-119.078** |
| Fígging: | | | |
| § 25. 64. Útvegan av gjaldføri | - | 119.078 | - |
| Fígging íalt: | - | 119.078 | 119.078 |
| **Samanlagt** | **17.939** | **17.939** | **-** |

## Broytingaruppskot:

| Tekstur | Deild | | | Broyting |
|---|---|---|---|---|
| *Fíggjarnevndin:* | | | | |
| -Avgjald av kapitaleftirlønum, nýggj meting FMR | 20710 | | | 4.845.000 |
| -DIS, FAS og frádráttir, nýggj meting FMR | 20801 | | | -535.000 |
| -Kommunuskattur, nýggj inntøkumeting | 20501 | | | -1.804.000 |
| -Felagsskattur, nýggj meting | 20601 | | | 2.000.000 |
| -Rentuútreiðslur, nýggj meting | 20301 | | | 2.300.000 |
| | | | | |
| **Inntøkur íalt** | | | | **6.806.000** |
| | | | | |
| **Tekstur** | **Deild** | **Rakstur** | **Íløgur** | **Broyting** |
| | | | | |
| ***Trivnaðarnevndin:*** | | | | |
| -Heilsu og umsorganart. Lønarregulering | 2700-2799 | 1.232.000 | | 1.232.000 |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| ***Náttúru- og umhvørvisnevndin:*** | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>27. apríl 2017 | Blað nr.: 65<br><br>Formansins merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| ***Mentamálanevndin:*** | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| ***Tekniska nevnd:*** | | | | |
| -Brandstøðin, rætting í lønum | 7210 | -369.000 | | -369.0000 |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| **Útreiðslur íalt** | | **869.000** | **0** | **869.000** |
| **Broyting íalt** | | **869.000** | | **5.937.000** |

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Umrøtt.

**Fíggjarnevndin 25. oktober 2016:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 14. november 2016:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein mæla býráðnum til at taka undir við uppskotinum til fíggjarætlan við niðanfyristandandi broytingum og við teirri viðmerking, at meirinntøkurnar fyri fíggjarárið 2016 skulu játtast til arbeiðið at byggja Skúlan á Fløtum:

| **Tekstur** | **Deild** | | | **Broyting** |
|---|---|---|---|---|
| ***Fíggjarnevndin:*** | | | | |
| -Avgjald av kapitaleftirlønum, nýggj meting FMR | 20710 | | | 4.845.000 |
| -DIS, FAS og frádráttir, nýggj meting FMR | 20801 | | | 1.717.000 |
| -Kommunuskattur, nýggj inntøkumeting | 20501 | | | 7.287.000 |
| -Felagsskattur, nýggj meting | 20601 | | | 2.000.000 |
| -Rentuútreiðslur, nýggj meting | 20301 | | | 2.300.000 |
| | | | | |
| **Inntøkur íalt** | | | | **18.149.000** |
| | | | | |

| | | |
|---|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>27. apríl 2017 | | Blað nr.: 66<br>Formansins merki: |

| Tekstur | Deild | Rakstur | Íløgur | Broyting |
|---|---|---|---|---|
| | | | | |
| -Fyrisiting, lønarregulering | 1110-1313 | 82.000 | | 82.000 |
| | | | | |
| -Heilsu og umsorganart. lønarregulering | 2700-2799 | 2.377.000 | | 2.377.000 |
| -Brandstøðin, rætting í lønum | 7210 | -149.000 | | -149.000 |
| **Útreiðslur íalt** | | **2.310.000** | **0** | **2.310.000** |
| **Broyting íalt** | | **6.748.000** | | **15.839.000** |

| Deild | Tekstur | Upphædd | Nevnd |
|---|---|---|---|
| **Rakstur** | | | |
| 6110 | Umsiting av røkt og bygningum | 5.000.000 | Byggi- og býarskipanarnevndin 30.09.16 |
| 6810 | Kloakkir | 4.000.000 | Náttúru- og umhvørvisnevndin 06.10.16 |
| 7110/8111 | Renovatión, tyrving og reinhald | 2.000.000 | Náttúru- og umhvørvisnevndin 06.10.16 |
| 6610 | Umhvørvispolitikkur | 1.000.000 | Náttúru- og umhvørvisnevndin 06.10.16 |
| 7210 | Viðlíkahald av bygningum í Nólsoy og Tórshavn | 500.000 | Tilbúgvingarnevndin 06.10.16 |
| 2721 | Náttarvakt, reingerð og uppraðfestingar | 7.730.000 | Trivnaðarnevndin 17.10.16 |
| 3215 | Endurgjald vegna longri sjúkralegu | 1.000.000 | Mentamánanevndin 17.10.16 |
| 7316 | Hugskotið | 500.000 | |
| 7311 | Ferðavinnan | 500.000 | |
| | Lopfjølin | 450.000 | |
| | Fíggjarligt fríðpláss | -500.000 | |
| | Ansingarøki | 2.800.000 | |
| **Løgur** | | | |
| 8175 | Útreiðslur til innkomuveg | 5.000.000 | Teniska nevnd 11.10.16 |
| | Skjótibreyt | 3.800.000 | |
| | Skúlin á fløtum | -<br>37.799.800 | |
| | **Íalt** | **-4.019.800** | |
| 20501 | Lækka skattin frá 19,75% til 19,00% | 29.231.000 | |
| | **íalt** | **25.211.200** | |
| | Avlop FÆ2017, sambært broytingaruppskoti 14.11.16 | 25.211.200 | |
| | **At fíggja** | **0** | |

Ein minniluti, Jógvan Arge, viðmerkir, at tað er ósiður, at fráfarandi stýri eftir býráðsval ger fíggjarætlan og ásetur skattaprosent v.m., ið bindur nýggja stýrið, og minnilutin tekur støðu til fíggjarætlanina á seinni fundi.

**Býráðsfundur 16. november 2016:** Samtykt við 9 atkvøðum fyri og ongari ímóti at taka undir við meirilutanum í fíggjarnevndini og fer fíggjarætlanin soleiðis samtykt til 2. viðgerð.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Jógvan Arge, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Bogi Andreasen greiddu ikki atkvøðu.

**Ískoyti:**
Niðanfyri eru uppskot til broytingar til fíggjarætlaruppskotið sum samtykt omanfyri:

Kontur 2720-2799: Nýggir lønarsáttmálar eru í heyst gjørdir við flestu fakfeløg innan økið, og sum ávirkar fíggjartørvin fyri 2017. Omanfyri er lagt upp fyri lønarregulering fyri fýra tey størstu av fakfeløgunum svarandi til tkr. 2.377. Ein sáttmáli er síðani komin aftrat, svarandi til tkr. 139.

Konta 2722 Tilboð: Inntøkumetingin fyri tilboð er tillagað staðfestu inntøkunum í 2016.

Konta 2731 Gjøld fyri røktartænastur: Inntøkumetingin er nærri tillagað staðfestu inntøkunum í 2016.

Konta 2761 Leiga: Inngingin er nýggjur leigusáttmáli fyri 2017-2018.

| **Broytingar Heilsu- og umsorganartænastan** | Tkr. |
|---|---|
| Lønarregulering konta 2720-2799 | 139 |
| Broytt inntøkumeting konta 2722 Tilboð | -2.000 |
| Broytt inntøkumeting konta 2731 Gjøld fyri røktartænastur | -600 |
| Leigugjald konta 2761 | 266 |
| | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til at taka undir við nevndu broytingum.

**Fíggjarnevndin 29. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. november 2016:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri og 3 ímóti við hesum broytingum:

Deild Tekstur Upphædd

Rakstur

| | | |
|---|---|---|
| 3313 | Klubb 188 | 100.000 |
| 3316 | Úthangið | 100.000 |
| | Klubb 160 | 300.000 |
| 5365 | Stuðul til ítrótt | 300.000 |
| 5717 | Ítróttaranlegg | 300.000 |
| 6110 | Umsiting og røkt av bygningum | -1.000.000 |
| 20301 | Rentu útreiðslur | -350.000 |
| 20910 | Aðrar útreiðslur | -29.000 |

Løgur

| | | |
|---|---|---|
| 6275 | Fríðkan av býnum | -2.000.000 |
| 6575 | Kirkjugarðurin við Velbastaðvegin | 2.000.000 |
| 8175 | Gamli Velbastaðvegur (Vinnuøki Vika) | 2.000.000 |
| 8175 | Stórheygg/Gerðisbreyt á Velbastað | 800.000 |
| 8175 | Ervaveg á Velbastað | 800.000 |
| 8175 | Útreiðslur til innkomuveg | -1.000.000 |
| | Íalt | 2.321.000 |

Eisini samtykt at áseta skattaprosenti til 19% og barnafrádráttin til 8.000 kr.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen

Ímóti atkvøddu:
Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

Viðmerking frá Tjóðveldi
Tjóðveldi atkvøður ímóti fíggjarætlanini 2017, tí skatturin verður lækkaður samstundis sum raksturin hækkar sløk 10%. Hetta fer at elva til størri skuldarbinding við lántøkum, skulu neyðugu ætlaninar fremjast. Víst verður eisini á, at íløguætlanin 2017 samstundis er lækkað nærum 35% niður í 85 mió kr.

**Ískoyti:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass skjóta upp at gera niðanfyristandandi broytingar í íløguætlanini fyri 2017:

| Uppskot til broyting av íløguætlan | | |
|---|---|---|
| | | |
| 5175 | Musikkskúlin | 15.300.000 |
| 2775 | Eldrarøkt | 2.000.000 |
| 4175 | Dagføring skúlar | -2.000.000 |
| 5775 | Ítróttarannlegg - Svimjihøll | -3.500.000 |
| 5775 | Ítróttarannlegg - Skjótibreyt | -3.800.000 |
| 6175 | Umsiting og røkt av fastari ogn (løgur) | -4.000.000 |

| | | |
|---|---|---|
| 8175 | Innkomuvegur | -4.000.000 |

**Fíggjarnevndin 18. januar 2017:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, taka undir við omanfyristandandi broytingum í íløguætlanini fyri 2017 og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við uppskotinum og mælir býráðnum til at halda fast við samtyktu fíggjarætlanina fyri 2017.

**Býráðsfundur 26. januar 2017:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Anniku Olsen, Gunnvør Balle, Marin Katrinu Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Boga Andreasen og Bergun Kass um niðanfyristandandi broytingar í íløguætlanini fyri 2017:

| Konta | Heiti | Broyting |
|---|---|---|
| 5175 | Musikkskúlin | 15.300.000 |
| 2775 | Eldrarøkt | 2.000.000 |
| 4175 | Dagføring skúlar | - 2.000.000 |
| 5775 | Ítróttarannlegg – Skjótibreyt | - 3.800.000 |
| 6175 | Umsiting og røkt av fastari ogn (løgur) | - 7.500.000 |
| 8175 | Innkomuvegur | - 4.000.000 |

ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Annika Olsen, Gunnvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass

Ímóti atkvøddu:
Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen

**Býráðsfundur 02. mars 2017:**Samtykt við 7 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurdsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Ìskoyti:**
Ein meiriluti, Annika Olsen, Bergun Kass og Marin Katrina Frýdal, skjýtur upp at gera niðanfyristandandi broytingar í fíggjarætlanini fyri 2017.

| Navn | Konto | Upphædd |
|---|---|---|
| Vetrarfriðing | 6275 | 1.000.000 |
| Lendisgøtur | 6275-I62019 | 1.000.000 |

| | | |
|---|---|---|
| Húsaumsitingin – Aulan í Finsens | 6109 | 500.000 |
| Stuðul annars - Sjósavnið | 5366 | 400.000 |
| Golfvøllur | 5775-I57016 | 300.000 |
| Vinnuverkætlanir – MICE | 7311 | 200.000 |
| Fimleikahøll | 5775-I57018 | -300.000 |
| Býarbókasavnið | 5475 | -1.500.000 |
| Aðrar inntøkur | 20910 | -1.600.000 |

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við omanfyristandandi broytingum og beina málið í býráðið.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Samtykt við 7 atkvøðum fyri og 5 ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass og Gunvør Balle

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen

# 132/17 Framflytingar roknskaparárið 2016

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.04.2017 | 97/17 | 17/01274-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 132/17 | 17/01274-1 |
| 3 Býráðsfundur | | | 17/01274-1 |

**Málslýsing:**
Mannagongdin hjá Tórshavnar kommunu er, at ikki nýttar játtanir verða fluttar til komandi ár. Hesar skulu játtast í býráðnum sum eyka játtan. Í sambandi við at roknskapurin fyri 2016 er gjørdur upp, er gjørt eitt yvirlit yvir rakstrar- og íløgujáttanir at flyta til 2017. Samlaða framflytingin fyri rakstur er 7,6 mió. kr. netto og ikki nýttar íløgujáttanir at flyta fram eru 170,6 mió. kr.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, Fyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla til at játta framflyting 7,6 mió. kr. netto, til rakstur og 170,6 mió.kr. til íløgur.

Vísandi til mál 17/01105, mæla kommunustjórin, fyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin harumframt til at flyta fram 159.396.054 til íløgur 2017 Tórshavnar havn.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og málið verður beint í býráðið at viðgera tvær reisir.
Klik her for at angive tekst.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Einmælt samtykt.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Heðin Mortensen og Gunvør Balle.

## 133/17 Ársroknskapur fyri Tórshavnar kommunu 2016

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.04.2017 | 98/17 | 17/01275-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 133/17 | 17/01275-1 |

**Málslýsing:**
Sambært kommunustýrislógini hevur fíggjarnevndin ábyrgd av at leggja grannskoðaðan roknskap, saman við grannskoðanarfrágreiðingini, fyri kommunustýrið til góðkenningar og undirskrivingar.

**Tilmæli:** Kommunustjórin, fyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina at góðkenna ársroknskapin fyri 2016.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2017:** Ársroknskapurin framlagdur og goðkendur og málið beint í býráðið.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Einmælt samtykt.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Heðin Mortensen og Gunvør Balle.

# 134/17 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2017

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 47/17 | 17/00303-1 |
| 2 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 88/17 | 17/00303-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 22.03.2017 | 75/17 | 17/00303-1 |
| 4 Býráðsfundur | 30.03.2017 | 105/17 | 17/00303-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 19.04.2017 | 100/17 | 17/00303-1 |
| 6 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 134/17 | 17/00303-1 |

**Málslýsing:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið. Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Tilmæli:**

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Framlagt og einmælt góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum

**Fíggjarnevndin 22. mars 2017:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 30. mars 2017:** Framlagt og einmælt góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2017:** Framlagt og góðkent.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Framlagt og einmælt góðkent.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Heðin Mortensen og Gunvør Balle.

**FUNDURIN LOKIN KL. 21:30**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Annika Olsen | Helena Dam á Neystabø | Tróndur Sigurðsson |
| Halla Samuelsen | Annfinn Brekkstein | Jákup Dam |
| Marin Katrina Frýdal | Bjørghild Djurhuus | Gunvør Balle |
| Turið Horn | Bergun Kass | Heðin Mortensen |
| | Sjúrður Olsen | |